Nr. 19 • Des. 2013

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Páll Hansen
Regin Nónstein
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Venjing í eldsløkking við Áir

**PDF ÚTGÁVA**
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.800

# Ein nýggj byrjan í Skálavík



*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*

Nýggj lóg um Semingsstovn varð samtykt í vár. Hon áleggur pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at avtala sínámillum reglur í áhugatrætu (konflikt). Hesar skulu í mista lagi innihalda reglur um fráboðanarform og fráboðanarfreist fyri arbeiðssteðgi.

Hetta mál gjørdist eisini partur av okkara sáttmálasamráðingum við Fíggjarmálaráðið um Strandferðsluna. Mótpartur okkara vildi ganga okkara ynski á møti um lægri arbeiðstíð, um vit vildu frásiga okkum rættin at fara í verkfall.

Feløgini boðaðu greitt frá, at so kom kostnaðurin at verða tann sami, sum tá limir okkara hjá Fiskiveiðieftirlitinum gjørdust tænastumenn. Eitt annað modell, sum var umrøtt, er skipanin í sáttmálanum fyri frálandaskip, har partarnir hava avtalað eina 5 ára friðarskyldu.

Semingsmenninir vildu ikki hava hesi viðurskifti við í einum semingsuppskoti – uttan so – at báðir partar ynsktu hetta. Teir hildu, at teirra uppgáva er ikki at uppfinna nýggjar spælireglur á arbeiðsmarknaðinum. Feløgini duga væl at síggja, at tíðin er helst farin frá teimum døgum har okkara samferðsla á sjónum kann leggjast lamin frá degi til dags. Men samstundis vóru vit ikki sinnaðir at lata verkfalsrættin fyri lægri arbeiðstíð. Vit hildu, at broytingina í arbeiðstíðini áttu vit óansæð.

Undan semingsroyndini fingu vit greið signal frá politisku skipanini, at eitt møguligt verkfall fór at verða steðgað við lóg beinanvegin. Sostatt stóðu vit í einari sera torførari støðu, sum væl kundi endað við, at vit vórðu bukaðir uppá pláss, uttan at hava fingið nakað sum helst av ábótum til limir okkara.

Tískil valdu vit at spæla út við, at vit vildu loyva einari avmarkaðari sigling í eitt stutt tíðarskeið meðan arbeiðssteðgur er. Saman við einum 3 ára sáttmálaskeiði, til at innføra nýggju lækkaðu arbeiðstíðina, gjørdist hetta bulurin í semingsuppskotinum. Feløgini vænta nú, at allir partar fara at virða, at nú hava vit gjørt reglar um, hvussu farast skal fram undir verkfalli og, at alt tos um at leggja uppí í óðum verkum má tagna.

Samanumtikið kann sigast, at vit fingu tað, sum vit fóru eftir. Vit halda ikki, at ein meira hóskilig skipan til at regulera komandi arbeiðssteðgir er til ógagns fyri limir okkara, sum sigla við Strandfaraskipunum.

*Vegna Mið og Magn*
*Eyðstein Djurhuus , ábyrgdarblaðstjóri.*



**4** Farmaskipasáttmálin nógv broyttur



**18** Kvinnur á Vinnuhákúlanum

# Innihaldsyvirlit

Ein nýggj byrjan . . . . . 2
Farmaskipasáttmálin nógv broyttur . . . . . 4
Vit skulu arbeiða meðan friður valdar. . . . . 6
Nýtt oljureinsiverk: Ein stórur vinningur fyri umhvørvið . . . . . 10
Bert Vinnuháskúlin letur fult viðurkent trygdarprógv . . . . . 14
Dekkarar læra tað grundleggjandi. . . . . 16
Sjómaður av tilvild: Karl Eli Samuelsen . . . . . 17
Kvinnur á Vinnuhákúlanum . . . . . 18
VERDANDI hvarv við 15 monnum . . . . . 22
Brennidepilin: Olivar Nolsø. . . . . 24
Nordiska Maskinbefelfederationen og Páll Hansen . . . . . 27
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum . . . . . 28
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . 30
Føðingardagar hjá limum okkara . . . . . 32
Lívið umborð: Magnus Heinason . . . . . 33
20 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum . . . . . 35
Stállínuskipini . . . . . 38
Áhugaverd bók um farmaskipið Oyrnafjall. . . . . 39



**33** Lívið umborð: Magnus Heinason



**10** Ein stórur vinningur fyri umhvørvið



**35** 20 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum

# Farmaskipasáttmálin nógv broyttur

Eftir drúgvar og harðar samráðingar er nýggjur sáttmáli fyri farma- og frálandaskip undirskrivaður. Sáttmálin er galdandi fram til 1. mars 2015. Fleiri ábøtur er vunnar, og nøkur grundleggjandi viðurskifti eru broytt.

## Ein minstulønarsáttmáli

Tá samráðingarnar byrjaðu førdu feløgini fram at munurin millum sáttmálønina og veruliga lønarlagi er nú vorði so stórt, at limir okkara venda sær í móti okkum. Teir føra fram, at hvat skulu vit brúka eitt fakfelag til, tá vit sjálvir mugu avtala eina hóskandi løn.

FSN hevði gjørt eina greining av lønarlagnum hjá øllum okkara 170 limum í FAS skipanini. Hon vísti at í miðal fingu limir okkara 15 % meir enn sáttmálalønina. Munurin var størst hjá teimum hægstu yvirmonnunum, serliga í frálandavinnuni og í farmasigling á norsku strondini. Lønarlagi hjá norskum og donskum reiðaríum er so uppaftur 15 % omanfyri føroysku induviduellu lønaravtalurnar. Reiðararnir viðurkendu parvíst, at vit hava eitt problem á hesum øki, og vóru sinnaðir til at gera broytingar.

## Karmurin er snávingarsteinurin

Feløgini hava tikið undir við, at tað skal bera til at avtala sær sjálvum eina hægri løn, men hetta má ikki forða fyri, at sáttmálalønin so eisini fylgir við uppeftir. Reiðarafelagið Fyri Farmaskip hevur hildið sera fast við, at lønarkarmurin fyri privata arbeiðsmarknaðin eisini skal galda fyri okkara sáttmála. Seinastu mongu árini hava flestu sáttmála broytingar havt til endamáls at fjala ymiskar lønarhækkingar, við tí endamáli at tað skal sýnast sum um at lønarkarmurin er galdandi.

## Broyttur bygnaður í lønartalvuni

Samráðingarnar hesaferð vóru onki undantak í so máta, munurin var bert at nú fóru vit meira miðvíst til verka. Lønartalvan hevur verið deild upp í 11 bólkar eftir skipa/motor stødd. Nú er talvan broytt soleiðis at 2 bólkar eru undir 3000 BT/KW og 2 omanfyri bólkurin ferðamannaskip omanfyri 21000 (Norrøna) eru óbroyttur. Hægstu lønirnar í gomlu talvuni er nú galdandi fyri allan tann nýggja bólkin, hetta merkir, at teir allarflestu fáa eina fitta lønarhækking. Neyvar útrokningar eru gjørdar av hesum, og limir okkara kunnu altíð fáa hesar.



| bólkur | BT/kW | *Gamla talvan* |
|---|---|---|
| 1 | <450 | |
| 2 | 450-749 | |
| 3 | 750-1499 | |
| 4 | 1500-2999 | |
| 5 | 3000-4999 | |
| 6 | 5000-5999 | |
| 7 | 6000-7999 | |
| 8 | 80000-9999 | |
| 9 | 10000-11999 | |
| 10 | 12000 og yvir | |
| 11 | Ferðamannaskip | |
| | 21000 og yvir | |

| bólkur | BT/kW | *Nýggja talvan* |
|---|---|---|
| 1 | <749 | |
| 2 | 750-2999 | |
| 3 | 3000-8000 | |
| 4 | 8000 og yvir | |
| 5 | Ferðamannaskip | |
| | 21000 og yvir | |

## Serstøk lønartalva fyri frálandavinnuna

Skipanin við einari serstakari viðbót fyri frálandavinnuna er ikki serliga gjøgnumskygd, tí hava vit nú gjørt eina serstaka lønartalvu fyri frálandaskipini, bygnaðurin í talvuni er tann sami, sum nevnt frammanundan. Áðrenn lønir og viðbótin vóru fluttar í nýggju talvuna varð viðbótin hjá skiparum og maskinstjórum umroknað til at verða ein prosent partur av lønini. Hetta merkir, at teir fingu eina eyka lønarhækking umframt aðrar hækkingar.




## Mugu eisini lata okkurt

FSN hevur nú einsljóðandi ásetingar um uppsøgn sum Maskinmeistarafelagið, tvs. at eyka uppsagnartíð fyri drúgva tænastu sambært sjómanslógini nú liggur í tí vanligu uppsagnartíðini, í mesta lagi 6 mánaðir. Navigatørar skulu nú sigast upp til tann fyrsta í einum mánaði, hetta hevur verið galdandi fyri MF í mong ár. Nú er ásett, at rætturin til heimferð er til bústaðin hjá sjómanninum. Fyrr stóð, at ein hevði rætt til ferð til Føroyar. Hetta hevur týdning fyri teir, sum búgva uttanlands, men sigla við føroyskum skipi.

## Egnar avtalur skulu dagførast

Ein onnur týðandi broyting er, at nú hava teir, sum hava egna lønaravtalu rætt til at fáa hesa dagførda, tá sáttmálin er broyttur. Hetta skal gerast innan 6 mánaðir, og ein hevur rætt at ráðføra seg við fakfelagið, áðrenn skrivað verður undir avtaluna. Fakfelagið hevur tagnarskyldu viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum vit fáa í hesar avtalur. Felagið kann tó vegleiða tann einstaka limin, um hvat eitt hóskandi lønarlag er fyri viðkomandi starv.

Tað eru fleiri mátar at gera egna lønaravtalu. Ein máti er at avtala eina fasta mánaðarløn, annar máti er sáttmálalønina pluss eina ávísa upphædd. Eisini ber til at avtala, at ein fær løn úr einum hægri bólki enn tann, sum skipið hoyrir til. Onnur viðurskifti kunnu eisini vera partur av avtaluni, men hon má ikki stríða ímóti meginreglunum í kollektiva sáttmálanum.

## Enn manglar nógv

Hóast nakrar ábøtur nú eru komnar í sáttmálan, so manglar nógv í enn. Málið hjá okkum er, at vit skulu kunna kappast við okkara grannalond bæði í setanatreytum og lønarlagi. Tað kann tykjast sum um, at føroyski arbeiðsmarknaðurin nú er vaknaður við kaldan dreym. Tí øll tann væl skikkaða arbeiðsmegin heldur vil starvast í útlondum. Eitt sera avgerandi mál, sum ikki er partur av sáttmálanum, er at FAS skattaskipanin er munandi verri fyri sjómannin enn skattaskipanin hjá teimum sum sigla uttanlands.

**Sáttmáli og lønartalvur eru á heimasíðunum hjá feløgunum:**

**WWW.MF.FO & WWW.FSN.FO**

# Vit skulu arbeiða meðan friður valdar

Nýggi stjórin í Føroya Reiðarafelag, Herálvur Joensen, ætlar broytingar í sáttmálasamráðingunum framyvir. Stóru stríðsspurningarnir skulu ikki goymast til evstamark, men loysast meðan friður er. Fyrireikingarnar eru longu byrjaðar.



Herálvur Joensen formaður í Føroya Reiðarafelag.

*Eftir Gunnar Skúvadal*

Á skrivaraborðinum hjá Herálvi Joensen liggur ársfrágreiðing nummar 102 hjá Føroya Reiðarafelag. Felagið varð stovnað í 1908, og ársfrágreiðingin varð skrivað eftir aðalfundin í 2011. Tann tiltikna stríðsfundin, sum var byrjanin til kollapsið. Fleiri nevndarlimir tóku seg úr nevndini, formaðurin fór frá, og felagið datt í veruleikanum meir ella minni sundur.

Tað hendi eftir, at felagið lockoutaði manningarfeløgini, sum ikki vildu góðtaka kravið, um at ein partur av útreiðslunum til olju skuldu fara av óbýttum. Men nøkur av skipunum lógu ikki leingi, tey lótu lockout vera lockout og fóru til fiskiskap kortini. Og so kom split í.

### Ikki semja um at útihýsa

– Tú kanst kanska siga, at munirnir millum ymsu limirnar í Reiðarafelagnum vórðu skornir út í papp tá, tí tað var jú ikki semja um at útihýsa manningarnar og leggja skipini, sigur Herálvur Joensen, sum byrjaði í stjórastarvinum hjá Føroya Reiðarafelag 1. mai í ár.

Men sum tíðin gongur makar hann vindin og sjógvurin slætnar. Og nú var stundin komin at leggja á annan bógv og fáa viðurskiftini skipaði aftur. Føroya Reiðarafelag er ein stórur og týðandi aktørur í føroyska samfelagnum. Eitt nú er álagt føroyskum reiðarum at hava umboð í fleiri almennum nevndum, ráðum og stýrum, og limirnir í hálvdeyða felagnum saknaðu eitt forum har teir stóðu saman, og drógu eina línu, í øllum førum í flestu málum.

Júst henda sannroyndin var ein partur av orsøkini til, at felagið valdi at seta ein stjóra, eftir sama leisti sum vit kenna frá Felagnum Nótaskip.

### Nýggj nevnd veljast næsta vár

Á næsta aðalfundi hjá Reiðarafelagnum, sum verður næsta vár, skal nýggj nevnd veljast við formanni, sum saman við stjóranum fer at mynda felagið.

Eg havi sett nýggja manninum á brúnni hjá føroysku reiðarunum stevnu á skrivstovuni hjá honum í Vinnuhúsinum, og eg byrji við at fregnast um, hví so lítið hevur verið at hoyrt til hann, nú meir enn eitt hálvt ár er farið, síðani hann byrjaði í starvinum. Eg spyrji, um tað er stílurin hjá tí spakføra aðalstjóranum ella sendimanninum, sum sæst aftur hjá stjóranum eisini.

Tað er rætt, at eg havi ikki verið nógv frammi alment síðani eg varð settur. Eg havi brúkt tíðina uppá at fáa felagið aftur at virka. Men eg eri greiður yvir, at tað er munur á at vera ein anonymur embætismaður, og so at standa á odda fyri einum felagsskapi sum hesum við peningaligum áhugamálum. Tað verður neyðugt at taka blaðið frá munninum av og á.

Átta feløg eru umboðað í Reiðarafelagnum. Og tað er greitt hjá einum og hvørjum at síggja, at spennið er vítt millum limirnar. Summir bólkar klára seg væl, aðrir hava reyð tøl ár eftir ár. Teir eru jú ósamdir um



Norðborg: Herálvur er settur eftir sama leisti, sum vit kenna frá Felagnum Nótaskip.

stórar spurningar. Hvussu fert tú at forða fyri, at split ikki aftur kemur í?

Her er tað neyðugt, at vit hugsavna okkum um tað, sum sameinir limirnar, og so taka tað, sum skilir upp í einum minni forum, mál fyri mál. Eg veit væl, at avbjóðingarnar vera stórar. Reiðarafelagið fer til dømis neyvan nakrantíð at hava eina felags støðu til, hvussu tilfeingið skal býtast. Dagføringin av fiskivinnulóggávuni er enn eitt potentielt stríðsmál. Og hvat hendir, tá vit fyrr ella seinni koma aftur í eina normalstøðu í stríðnum við útheimin um pelagiska fiskin. Fyrr ella seinni kemur væl ein strandalandaavtala. Hvussu fer tað at ávirka okkara limir og broyta tað lutfallið, sum nú er?

Men hava summir av limunum yvirhøvur nakað í felag? Eg hugsi enn um spennið millum tær ríku og tær fátæku fyritøkurnar?

Fleiri av feløgunum, sum klára seg væl, hava sett pengar í hjá teimum, sum klára seg minni væl. Vit mugu eisini minnast til, at feløgini



*Viðberg Sørensen fegnast um nýggju støðuna hjá Føroya Reiðarafelag.*

øll uppliva tær broyttu kringumstøðurnar og eina alsamt vaksandi kapping við útheimin um manningarnar. Eg síggi fyri mær, at reiðaríini í framtíðini fara at rotera manningarnar millum ymsu skipabólkarnar í eini fastlønarskipan. Sami maður fer kanska í einum inntøkuári at vera bæði við einum línubáti, einum garnaskipi og, hvør veit, kanska fer hann eisini ein túr við einum skipi í frálandavinnu. Okkurt er sum spjaðir, men tað er sanniliga eisini nógv sum sameinir.

## Útlendskar manningar

Hvat heldur tú um útlendska manning umborð á føroyskum skipum?

Tað er alt ein partur av tí sama. Tá føroyingar leita sær út í lond at manna skip, so mugu vit eisini góðtaka, at útlendingar koma hendaveg. Eg veit, at tað er nærum vónleyst at fáa føroyska manning til summi skip. Eg kundi nevnt maskinfólkini umborð á línubátunum. Her mugu vit góðtaka, at eitt ávíst tal at útlendingum kemur hendaveg.

Hvussu fer tað at síggjast aftur í samráðingunum, at Reiðarafelagið hevur sett ein stjóra?

Forarbeiðið til samráðingarnar skal gerast, meðan friður valdar. Tá samráðingarnar byrja má hol vera sett á teir stóru stríðsspurningarnir, so tær størstu ósemjurnar ikki liggja til evstamark. Ein arbeiðsbólkur er um at blíva mannaður til at taka sær av júst hesum. Høvuðsendamálið við at seta ein stjóra fyri felagið var júst at fáa eina meira samskipaða tilgongd til samráðingarnar. So tað fer at síggjast.

Eg beit merki í, at uttanfyri er navnaskeltið hjá Reiðarafelagnum ikki komið upp at hanga millum hini. Er nakar súmbolikkur í tí?

Nei! Føroya Reiðarafelag er komið undir tak hjá Vinnuhúsinum, og har verður felagið búgvandi, so leingi sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur adressuna her. Gamaní er ikki full semja um alt millum reiðarar og vinnuna annars. Eitt nú er støðan hjá Vinnuhúsinum at fylgja lívfrøðiligu tilráðingini og áseta fiskidagarnar eftir tí. Reiðararnir halda ofta støðuna vera meira „nuanseraða". Men tað er so tað. Fyrimunirnir í húsinum eru eyðsýndir, tí her eru kompetansur, sum vit dagliga kunnu fáa nyttu av. Hartil hava feløgini jú eisini frá gamlari tíð verið undir sama taki, so tað er onki ónatúrligt í tí, at vit halda til sama stað.

Var tað eitt krav frá tær, at Reiðarafelagið skuldi halda til í Vinnuhúsinum? Nei, tað avgerðina tók nevndin áðrenn hon søkti eftir stjóra, er stutta svarið hjá Herálvi Joensen.

### Átta limafeløg eru í Føroya Reiðarafelag:

- Verksmiðjutrolarar
- Nótaskip
- Ídnaðarskip
- Rækjuskip
- Lemmatrolarar
- Partrolarar
- Línuskip
- Garnaskip.

Áleið 80 skip eru tilsamans umboðað í felagnum.

### Stutt um nýggja stjóran: Herálv Joensen

Herálvur Joensen er løgfrøðingur við sergrein í altjóða rætti og havrætti.

Hann arbeiddi í 10 ár við olju, var við til at skriva oljulóggávuna og var aðalstjóri í oljumálaráðnum í 1999 til 2004.

Hann var aðalstjóri í Fiskimálaráðnum frá 2004 til 2006.

Hann var sendimaður fyri Føroya Landsstýri í Keypmannahavn frá 2006 – 2011.

Hann var leiðari á Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni frá 2011 til 2013.

Hann byrjaði í starvi sum stjóri í Føroya Reiðarafelag 1. mai 2013.



Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



# Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

## og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri olju-gas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

KREA

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.



*Jacob Petur Johannesen leiðari á nýggja oljureinsiverkinum hjá IRF á Hagaleiti. Vit síggja eisini sentrifugurnar høgrumegin.*

# Ein stórur vinningur Fyri umhvørvið

Nýggja oljureinsiverkið hjá IRF á Hagaleiti reinsar 3500 rúmmetrar av olju og oljudálkaðum vatni um ári, og samstarvið við vinnuna er gott

Hetta er eitt stórt framstig fyri umhvørvið. Tað sigur Jacob Petur Johannesen, leiðarin á nýggja oljureinsiverkinum hjá IRF á Hagaleiti.

Í september tók IRF nýggja oljureinsiverkið á Hagaleiti í nýtslu. Samstundis varð reinsiverkið á Kambsdali niðurlagt.

Sostatt verður alt burturkast, sum stendst av oljunýtslu, nú savnað hjá IRF á Hagaleiti.

– Vit koyra kring landið við tangabilum og heinta spillolju, smyrjolju, tungoljuevju og oljudálkað vatn, sum vit síðani føra til oljureinsiverkið, sigur Jacob Petur Johannesen.

– Tað mesta, vit taka av olju, er frá skipum, umframt frá SEV á Sundi og í Vági.

Men nakað kemur eisini frá bilaverkstøðum.

– Vit taka ímóti allari olju, vit vera biðin um at taka. Vit hava tangabilar, sum koyra landið runt eftir olju, sum bilverkstøð, SEV, skip og onnur, sum brúka olju, hava savnað saman.

Oljuna taka vit ímóti fyri einki, men oljudálkað vatn taka vit 50 oyru liturin fyri at taka ímóti, tí tað er tað dýrasta at reinsa.

## Strong krøv

Á reinsiverkinum verður oljan hitað og vit skilja vatnið frá.

– Vatnið verður síðani reinsað og leitt á sjógv.

Jacob Petur Johannesen sigur, at vatnið, sum verður latið á sjógv, er at kallað gullreint, tí umhvørvisgóðkenningin setir strong krøv til spillvatnið.

– Vit hava ávís markvirði at halda okkum niðanfyri og tað klára vit, vísa tær royndir, vit hava tikið.

Hinvegin verður oljan sentrifugerað, so at bitlar og sót seta frá og tað verður so brent á brennistøðini.

– Tann reinsaða oljan verður seld aftur. Í umhvørvisgóðkenningini stendur, at oljufýrið, vit lata til, skal verða størri enn eitt megawatt og tað eru bara trý oljufýr í landinum av hasi støddini, tað hjá Fjarðhitafelagnum í Havn, Høvdavirkið í Leirvík og Havsbrún.

– Tað eru eisini umhvørviskrøv til oljuna, men vit hava ikki havt trupulleikar at halda okkum niðanfyri markvirðini. Vit skulu taka fýra roydir um árið av bæði vatnið og olju. Er ov nógv tungmetall í oljuni, sleppa vit ikki at brenna hana aftur í Føroyum, tí so skal hon førast av landinum.

Jacob Petur Johannesen sigur, at IRF fær 50 oyru fyri liturin av teirri reinsaðu oljuni, so tað er væl bíligari, enn oljan annars kostar, so tað er eisini ein góður vinningur hjá teimum fyritøkum, sum keypa.

Hann sigur, at hinvegin er tað ivingarsamt, um hetta er nøkur forrætning hjá IRF, men tað melur runt, saman við einum ískoyti frá landinum.

## Tungur burður

Tað hevur annars verið ein tungur burður at fáa hetta oljureinsiverkið í drift.

Upprunaliga var eitt privat oljureinsiverk á Kambsdali.

– Tað virkið var gott, tá ið tað kom. Men síðani eru nøgdirnar nógv vaksnar og krøvini eru vorðin nógv strangari og tað endaði við, at landið og IRF tóku yvir.

– Í veruleikanum er hetta ein landsuppgáva, IRF hevur tikið á seg og í tí sambandi gjørdu vit av at útvega okkum eitt spildurnýtt reinsiverk, sum nøktar tørvin nakað nógv ár fram í tíðina.

– Tey flestu skipini brúka tungolju, sum skal hitast upp fyri at fáa hana ígjøgnum skipanina. Tí bygdu vit verkið við brennistøðina, tí so kunnu vit brúka avlopshita frá brennistøðini at hita reinsiverkið við.

Skuldi virkið hildið fram á Kambsdali, skuldu vit brúkt dieselolju, so síðuvinningurin við at leggja tað upp at brennistøðini, er, at hetta reinsiverkið er nógv umhvørvisvinarligari.

Jacob Petur Johannesen sigur, at nýggja reinsiverkið er slóðbrótandi, tí hetta er fyrsta verk, sum reinsar bæði olju ov vatn. Aðrastaðni hava tey reinsiverk, sum bara reinsað vatnið frá, so verður oljan send á stór oljureinsiverk.

– Men vit eru smá og vit skulu klára alt og tí hava vit fingið bygt tvey verk saman.

Reinsiverkið varð tikið í brúk í september í ár.

Men tað var ein tungur burður. Upprunaliga skuldi reinsiverkið takast í nýtslu í mai í fjør.

Men so tóku leveringstrupulleikar seg upp við sentrifuguni og øðrum deilum, so tað varð útsett, fyrst til september, síðani til oktober og at enda til desember.

Men so hendi tað, at virkið, sum gjørdi reinsiverkið, fór á heysin ímillum jól og nýggjár.

– Alt hekk so í tí óvissa heilt til í mai mánað, tá vit fingu eitt annað virkið at gera reinsiverkið liðugt.

Og tað endaði so við, at reinsiverkið kundi takast í brúk í september, meiri enn eitt ár seinkað, sigur Jacob Petur Johannesen.

*Nýggja oljureinsiverkið á Hagaleiti.*



### 3.500 rúmmetrar

Reinsiverkið tekur ímóti einum 3500 rúmmetrum av olju og oljudálkaðum vatni um árið.

Kapasiteturin á reinsiverkinum er annars 5000 rúmmetrar um árið og tá verður roknað við vanligari arbeiðstíð, átta tímar um dagin, fimm dagar um vikuna.

Men hendir ein stór oljudálking, ber til at fáa rættiliga nógv ígjøgnum í eitt ávíst tíðarbil.

Jacob Petur Johannesen sigur, at hetta er eitt stórt framstig fyri umhvørvið.

– Fyrr var ikki óvanligt at síggja, at tunnur vóru bara skornar upp og eldur settur á. Soleiðis slapst av við oljuna tá.

Hann dugir ikki at siga, hvussu stóran part av oljuni, verður latin oljureinsiverkinum.

– Skip lata eisini olju í fremmandum havnum og tað kanna vit ikki. Motorar brenna eisini olju, so tað er ikki so lætt at siga, um nakað framvegis verður fyribeint óregluliga.

Hinvegin skráseta vit alt vit taka ímóti og hvat slag tað er, um tað er oljudálkað vatn, tungolja, smyrjolja, ella hvat tað er. Vit skráseta eisini, hvussu nógv vit taka frá hvørjum.

Men sjálvur heldur Jacob Petur Johannesen, at tað kemur inn, sum skal koma inn, sum hann málber seg.

– Tað er eisini rættiliga ómakaleyst at sleppa av við oljuna. Tað er bara at ringja, so koma vit, sigur leiðarin á oljureinsiverkinum. Nógvar havnir, serliga tær størru, hava tangar, sum skip pumpa upp í og so tøma vit tangarnar.

– Talan er um eitt gott samstarv ímillum allar partar og eg haldi, heldur ikki, at vit síggja nakað til oljudálkingar longur, uttan so at talan er um leka, ella eitt beinleiðis óhapp undir bunkring, o.s.fr, sigur Jacob Petur Johannesen.

At enda í samrøðuni við Jacob Petur greiðir hann frá, at oljureinsiverkið hevur eina sera góða teletænastu.

Ringjast kann allan sólarringin á telefon 234214 ella 414243.

| Tangayvirlit hjá Oljureinsiverkinum | | |
|---|---|---|
| 1. stk. | Móttøkutangi | $60^3$ |
| 1. stk. | Uppsamlingartangi | $60^3$ |
| 2. stk. | Setlingstangar | $60^3$ |
| 2. stk. | Sentrifugutangar | $60^3$ |
| 1. stk. | Vatntangi | $25^3$ |
| 2. stk. | Reinoljutangar | $70^3$ |
| 1. stk. | Sentrifuga | 53 um tíman |
| Umframt hevur IRF fleiri $11^3$ slambilar | | |



*Hetta er ein av teimum stóru tangunum. Tann størsti er 70m³.*




# Tú ringir vit heinta

Telefon 41 42 43 ella 23 42 14




## Gev spilloljuni **nýtt** virði

FØROYAPRENT

IRF

**IRF** · Telefax: 41 42 44 · Postboks 39 · FO-520 Leirvík · irf@irf.fo

# Bert Vinnuháskúlin letur fult viðurkent trygdarprógv

Hóast trinni støð skipa fyri trygdarskeiðum í Føroyum, er tað bert Trygdardepilin hjá Vinnuháskúlanum, sum kann lata fult altjóða viðurkent prógv, sigur leiðarin á deplinum við Áir Signheðin Davidsen



Signheðin Davidsen er deildarleiðari á Trygdardeplinum hjá Vinnuháskúlanum við Áir.

Trygdarskeiðini hjá Trygdardeplinum hjá Vinnuháskúlanum hava tað fram um onnur skeið, sum útbjóðarar í Føroyum halda, at tey eisini hava góðkent skeið í roykkaving, sigur Signheðin Davidsen, deildarleiðari á Trygdardeplinum hjá Vinnuháskúlanum.

Ymiskt skeiðsvirksemi, millum annað trygdarskeiðini, vórðu fyri nøkrum árum síðan flutt av Vinnuháskúlanum til Trygdardepilin við Áir. Eitt nú verður skipað fyri brandskeiðum og øllum teimum vanligu skeiðunum fyri sjófólk. Sjómansskúlin, sum skúlin tá æt, byrjaði at skipa fyri trygdarskeiðum í fyrru helvt av sjeytiárunum í seinastu øld. Seinni í sjeytiárunum varð økið trygd á sjónum rættiliga nógv uppstrammað, sigur Signheðin Davidsen. Fyrsti IMO – International Maritime Organization – sáttmálin varð undirskrivaður í 1978.

Nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður í 2010 og settur í gildi á nýggjárinum 2012. Tað er hesum sáttmála, sum tað í dag verður arbeitt eftir.

Tá tosað verður um IMO, eru summi, sum halda, at her er talan um alt, sum hevur sítt virki á sjónum. Men soleiðis er í veruleikanum ikki, sigur deildarleiðarin á Vinnuháskúlanum. IMO umfatar bert tað, sum flytur seg á sjónum, og ikki eitt nú boripallarnar. Tískil kann Trygdardepilin ikki bjóða øll skeið til teirra, sum arbeiða har. Tey kravdu skeiðini til teirra verða vanliga hildin í Noreg, sigur hann.

## Vaksandi undirtøka

Tað tykist vera vaksandi áhugi fyri skeiðunum hjá Vinnuháskúlanum, sigur Signheðin Davidsen. Higartil í ár hava 675 næmingar verið á skeiði við Áir. Næmingarnir fáa trygdarskeið, bátaførarskeið og brandskeið.

Tað koma bæði navigatørar og maskinmeistarar á skeið á deplinum, og tað er eitt sindur ymiskt, sum teir taka av skeiðum.

Navigatørarnir fáa alla skránna, og teirra skeið skal endurnýggjast fimta hvørt ár. Soleiðis nýtist ikki at vera hjá maskinmeistarunum. Teir taka eitt skeið í medisinskari fyrstuhjálp, og teirra skeið gongur ikki út eftir altjóða reglum. Hetta skeiðið við medisinsku fyrstuhjálpini verður ikki brúkt í Danmark, men er kravt í Noreg. So teir, sum arbeiða har, skulu hava tað.



Ein brunnur fullur av olju skal sløkkjast.



Oljudálkaðir skeiðluttakarar.

Tað hevur onkuntíð verið fýlst á, at øll hesi skeiðini, sum krevjast í dag, taka so stóran part av frítíðini hjá manningunum. Men tað er nú hjálpt upp á hetta við at lata manningarnar sleppa at taka tann teoretiska partin av trygdarskeiðnum og bátaføraraskeiðnum á internetinum. Menn sita nú og terpa á frívaktunum og fáa undirvísing umvegis Skype. Síðan verður tikin ein dagur við praktiskum uppgávum á Trygdardeplinum, tá teir eru heima.

## Undantøkini

Fyrr hevur tað verið soleiðis, at skeiðini ofta hava verið hildin har, reiðaríið býr. Men nú eru alt fleiri reiðarí gingin yvir til, at manningarnar fara á skeið í egnum heimlandi. Tað ger so, at fleiri føroyingarnir koma á skeið hjá Trygdardeplinum. Umframt koma eisini nakrir útlendingar. Men tá er oftast talan um útlendingar, sum búgva í Føroyum.

Hóast talan fyrst og fremst er um trygd, eru tó undantøk. Tað eru nevniliga bara tey, sum eru við førum, sum mynstra, ið verða kravd á trygdarskeið. Manningar á t.d. smærri útróðrarbátum hava ikki fyri neyðini at taka hesi skeiðini, upplýsir Signheðin Davidsen.

Og so eru tað summi av smærru skipunum, eitt nú gomlu línuskipini, har ikki er kravt, at roykkavaraútgerð er umborð. Tað ger so, at heldur ikki er kravt av manningunum á hesum førum, at tey hava roykkavaraskeið.

„Men tað kann so aftur bíta seg sjálvt í halan", sigur hann og vísir til eitt dømi, har ungur maður hevði fingið kjans við lítlum donskum farmaskipi og fór á trygdarskeið í Føroyum, har roykkavaraskeiðið ikki var íroknað, við tí ólukkuliga úrslitið, at hann varð vendur í hurðini, tá hann møtti upp hjá reiðarínum, tí har var roykkavaraskeiðið kravt.

– So skilagott er at binda um heilan fingur og taka alt beinanveg, vísir deildarleiðarin á Trygdardeplinum hjá Vinnuháskúlanum á.

**Næmingatal síðan 2004:**

| | |
|---|---|
| 2004 | 387 |
| 2006 | 524 |
| 2008 | 445 |
| 2010 | 598 |
| 2011 | 682 |
| 2012 | 764 |
| 2013 (*til 25. Okt.*) | 675 |



# Læra tað grundleggjandi

Á Sjónámi í Klaksvík byrjar ein dekkaraflokkur eftir nýggjár. Talan er um gamalt hugskot, sum hevur verið roynt fyrr, men ein steðgur hevur verið nú eina tíð



Hanus-Kjolbro, deildarleiðari.

## Blandað tilfar

Undirvísingin og næmingatilfarið verður eitt sindur blandað bæði so og so, greiðir Hanus Kjølbro frá.

– Næmingarnir, sum higartil eru tilmeldaðir, eru úr øllum landinum og í øllum aldri. Tó eru ótrúliga fáar kvinnur, sum hava víst áhuga, sigur hann.

– Sjálv undirvísingin verður eisini rættiliga blandað. Talan verður bæði um bókliga og meira verkliga útbúgving.

– Farið verður til verka frá grundini. Næmingarnir skulu stutt sagt læra, hvussu teir koma til hús aftur við egnari hjálp, tá farið verður á flot.

– Her verður lært at arbeiða við metali, við togum og reipum, at navigera og at passa maskinur, soleiðis, at næmingurin fær eina hilling av, hvat umráðandi er at vita og duga, tá ein skal flóta. Tey skulu hava eitt sindur av smiðjulæru, duga at spleysa ein enda, at stýra einum skipi og so framvegis.

– Deildarleiðarin á sjóvinnuútbúgvingini vísir á, at her er bókstavliga talan um sjóvinnuútbúgving. Tað vil siga um sigling og grundleggjandi sjómansskap, og at útbúgvingin einki beinleiðis hevur við fiskivinnu at gera.

– Við í hesi útbúgvingini, sum nú byrjar, eru eisini trygdarskeiðini, sum Sjónám hevur at bjóða. Roykkavaraskeið kann tó ikki takast hjá Sjónámi, vísir deildarleiðarin á.

## Altjóða góðkenning

Talan er um útbúgving, sum hevur sín uppruna aftur í áttatiárunum í farnu øld, tá hugskotið fyrstu ferð var frammi. Stovnað var formelt ein útbúgving, sum ikki fór at virka, greiðir Hanus Kjølbro frá.

– Nøkur ár seinni varð hugskotið tikið uppaftur, og í 1991 varð stovnaður ein sjóvinnuflokkur, sum fekk rættiliga góða undirtøku, ið tó fánaði burtur aftur so líðandi.



Venjing í draktum.

– Hendan útbúgvingin varð tó ongantíð dagførd, og strongt hevur verið á at fáa hana dagførda.

– Í 2010 komu umboð fyri IMO at kanna Føroyar sum flaggtjóð, og tá fingu vit at vita, at vit mangla eina altjóða góðkenda – STCW – útbúgving av sjófólki.

–Vit hava tikið tað til eftirtektar. Vit gleða okkum til at fara undir hesa útbúgvingina, og vóna, at undirtøkan eisini framhaldandi fer at vera líka góð, sum hon tykist, nú vit byrja við fyrsta flokkinum, staðfestir Hanus Kjølbro, deildarleiðari á sjóvinnuútbúgvingini hjá Sjónámi.



# Sjómaður av tilvild

*Eftir: Karl Eli Samuelsen*

Eg byrjaði mítt arbeiðslív á landi, og sá fyri mær, at eg helst kom at starvast á landi alt lívið, tí tað treivst eg við.

Pápi hevur í yngri døgum siglt nógv við fiskiskipum undir Føroyum og valdi hann at taka eina útbúgving sum skipari, og sigldi hann líka til einaferð í fyrru helvt av 90-unum.

Tríggir av beiggjunum hava valt at starvast á sjónum, so helst var tað ikki løgið at fleiri gingu út frá, at mín leið eisini mundi ganga sjóvegin, men júst hettar hevði eg ongar ætlanir um.

## Maskinførari við studentsprógvi

Eftir at hava fingið studentsprógv í hondina byrjaði eg í starvi hjá byggifyritøku í Havn, og starvaðist eg har sum maskinførari og eitt skifti sum arbeiðsformaður. Ólukkutíð í 2007 fer fyritøkan av knóranum, so annað starv mátti finnast. Fór til Grønlands í eitt hálvt ár at gera flogvøll, men afturkomin ringir ein í familjuni hjá konuni, sum sigldi sum stýrimaður, við einum sokallaðum coastara í Runavík, og spurdi um eg ikki kundi koma ein túr við teimum, tí teimum manglaði ein mann eina útmynstring. Eg ivaðist stórliga um hettar var nakað fyri meg, men av teirri einføldu grund, at eg í løtuni var arbeiðsleysur kundi eg ikki takka nei til møguleikan.



## Treivst væl umborð

Eg treivst væl umborð og fekk bjóðað fastan kjans, tíðin gekk og sjólívið vísti seg at vera júst nakað fyri meg. Konan hevur onkuntíð seinni skemtað við, hvussu lívið av tilvild broytist; hon hevur nevniliga altíð sagt bæði við seg sjálva og við meg at: „sjómann vildi hon ikki hava", og eg kundi bara taka undir við henni og svara: „so hevur tú valt rætt, tí sjómaður verði eg ongantíð".

Men hóast stóru kósbroytingina á lívsleiðini má sigast, at skipanin at „sigla við orðning" skapar so mikið nógvar møguleikar. Fyrst og fremst er tað at hava eina fasta inntøku, sum ger at tað skapar fíggjarligt støðufesti. Annar fyrimunur er, sum onkur tekur til: „tá ein so er heima, so er ein 100% heima."

Eftir at tað lá greitt, at ein skuldi starvast á sjónum framyvir, varð nærliggjandi at royna at fáa eina maritima útbúgving, og var hugurin betri til brúnna heldur enn maskinrúmið.

## Ávegis til skipsførara

Í løtuni eri eg í ferð við at gera seinasta hálvárið til skipsførara liðugt, á Vinnuháskúlanum í Havn, og er tað ein sera góð og hugnalig tíð. Prátið, ið gongur millum næmingarnar á skúlanum snýr seg í mesta mun um vónandi at fáa kjans í oljuvinnuni. Tað vísir seg, at rákið er beint av landinum í løtuni, arbeiði viðvíkjandi, og er tað ikki so løgið, tí stórur partur av fiskiflotanum koyrir við undirskoti.

Tað er sera spennandi at fylgja við í menningini hjá føroysku „oljureiðaríunum", tað verða alsamt fleiri og fleiri veitingaskip bygd, og um hugsað verður fram í tíðina, ja so er tað kanska bara gott, at vit hava nógvar dugnaligar navigatørar og maskinmenn, ið nema sær førleikar innan oljuøkið uttanlands, tí at hvør veit um ikki onkur dropin kanska verður at finna røttu megin føroyska markið einaferð um ikki so leingi.

PETUR HANS DAHL:

# Gott at fáa fleiri gentur á skúlan

Javnstøða hevur eisini sína ávirkan á Vinnuháskúlan heldur virkandi varaskúlastjórin, Petur Hans Dahl



*Petur Hans Dahl, virkandi varaskúlastjóri.*

**– Hetta er fínasta slag.**

Petur Hans Dahl fegnast um, at eisini gentur hava fingið eyguni upp fyri sjóvinnuútbúgvingunum.

Í dag ganga fýra gentur á Vinnuháskúlanum, tríggjar ganga til maskinmeistara og ein gongur á navigatiónsskúlanum.

Tað ljóðar ikki av so nógvum, men stjórin sigur, at í veruleikanum er hetta eitt søguligt frambrot.

– At tað ganga fýra gentur á Vinnuháskúlanum nú, er næstan líka nógv, sum tað annars hava verið gentur á Vinnuháskúlanum tilsamans øll árini, síðani hann varð stovnaður fyri 120 árum síðani.

– Tað er ikki meiri enn hendinga ferð, at gentur hava søkt á sjóvinnuskúla. So vítt eg minnist eru tað bara fimm gentur, sum hava gingið til navigatør í allari søgu skúlans og tvær ella tríggjar hava tikið prógv sum maskinmeistari, sigur Petur Hans Dahl.

## Gott fyri skúlan

At fleiri gentur ganga á skúlanum nú, er bara gott fyri skúlan, heldur Petur Hans Dahl.

– Tað skerst ikki burtur, at tað er lívligari á skúlanum við báðum kynum millum næmingarnar, so eg vóni, at fleiri gentur fáa eyguni upp fyri hesum møguleikanum, sigur hann.

Hann sigur, at genturnar smæðast avgjørt ikki burtur ímillum og fakliga er eingin munur á kynunum.

– Eg dugi ikki at síggja nakra sum helst orsøk til, at ikki eisini gentur skulu kunna taka eina sjóvinnuútbúgving, sigur virkandi stjórin á Vinnuháskúlanum.

Hann dugir ikki at siga, hví ikki fleiri gentur eru komnar á skúlan, tí tær hava akkurát líka góðar førleikar fyri at klára tað, sum dreingir hava.

Men hann hevur fatan av, at hetta er eitt fak, sum eisini er farið at vekja áhuga hjá gentunum.

– Eg haldi, at alt prátið um javnstøðu hevur eisini sína ávirkan.

Hann vísir á, at umframt at sigla, gevur serliga maskinmeistarafakið eisini nógvar møguleikar á landi, eitt nú hjá SEV, á flakavirkjum og øðrum virkjum á landi.

– Og eftir at hava arbeitt eina tíð, kann maskinmeistari eisini fáa góðkenning sum El-insallatør.

## Lættari

Petur Hans Dahl væntar, at í framtíðini fer tað at verða lættari at kvalifisera seg til Vinnuháskúlan.

– Fyri at sleppa at ganga til navigatør krevst siglingartíð, eisini við farmaskipi, og tað er ikki altíð líka lætt, tí farmaskipini eru ikki so mong í tali.

Men serliga vísir tað seg at vera ringt hjá gentum at fáa siglingstíð við fiskiskipum.

Hann heldur ikki, at tað er beinleiðis illvilji ímóti at fáa gentur umborð, sum ger seg galdandi.

– Men onkursvegna er hugburðurin ikki til tað. Í øllum førum vísir tað seg ikki at vera lætt hjá gentum at sleppa umborð á fiskiskip.

– Avmarkingin er helst meiri í hugaheiminum enn hon er verulig, sigur Petur Hans Dahl.

At vit so eisini hava so fá farmaskip er so ein avmarking afturat.

– Men nú fáa vit eina skipan, har skipini, sum eru undir FAS, hava skyldu til at taka aspirantar og tað fer at gera tað lættari at fáa siglings:tíð, eisini hjá gentum.

Hann sigur, at tann skipanin er komin heilt undir land.

Samstundis er avtalað fingin í lag við Søfartssyrelsen, at har talan er um trolarar yvir 500 tons, telur tað sum siglingartíð við farmaskipi, men so krevst, at útbúgvingarbók er við.

Samanumtikið væntar varaskúlastjórin, at hetta fer at gera tað lættari at fáa siglingstíð yvirhøvur, men ikki minst væntar Petur Hans Dahl, at hetta fer at gera tað lættari hjá gentum at sleppa á navigatiónsskúla.

# Elisabet Dalsgaard:
# Kom at røttu hillini

Maskinfakið er akkurát eg, sigur Elisabet Dalsgaard av Sandi

**– Eg eri komin akkurát á røttu hillina.**

Elisabet Dalsgaard er av Sandi. Hon er fegin um, at hon tók stigið og søkti á Maskinmeistaraskúla á Vinnuháskúlanum.

Men at hon endaði á maskinskúlanum, var líka nógv av tilvild, sum tað var úrslitið av eini tilrættislagdari ætlan.

Elisabet Dalsgaard er av Sandi, men hon býr í Streymnesi.

Hon fór á studentaskúla í Hoydølum, men tað var mest tí, at tað gjørdu øll hini.

Har fann hon so útav, at tey málsligu fakini, og tað at skriva stíl, segði henni akkurát einki.

– Í Hoydølum fann eg so útav, at tey matematisku fakini vóru nógv stuttligari enn tey málsligu, sigur hon.

## Vildi hava útbúgving

Tá ið Elisabet var liðug í Hoydølum, ætlaði hon at arbeiða eitt ár fyri at forvinna sær eitt sindur av pengum.

– Men tað kom altso ikki so nógv burturúr, ásannar hon.

Hon vildi kortini hava eina útbúgving, tí eina framtíð sum ófaklærd í einum handli, ella okkurt sovorðið, tiltalaði hana avgjørt ikki.

– Eg gekk so fyri einki, men bara fyri at royna okkurt, søkti eg inn á tekniska Skúla, har eg kundi taka SIT 1 og 2.

– Har hevði eg motorlæru og tá fann eg útav, hvussu spennandi tað var.

Elisabet gekk eisini á el-deildini og tað dámdi henni eisini sera væl.

Heima tosaði hon nógv við pápa sín um framtíðina. Hann er maskinmeistari og eggjaði henni til at søkja á Vinnuháskúlan at læra til maskinmeistara.

– Tað var eisini mestsum bara fyri at royna tað, at eg fór á skúla. Men eg fann skjótt útav, at hetta var akkurát eg og, at eg var komin á mína røttu hill, sigur Elisabet Dalsgaard.

## Lønin togar

Elisabet sigur, at tá ið hon er liðug, ætlar hon sær at sigla í eina tíð.

Hon hevur eisini rættiliga góðan hug at sleppa á ein oljupall, ella okkurt sovorðið.

Í hesum sambandi dylir hon ikki fyri, at tað er lønin, sum togar hana tann vegin.

Men hon hevur eisini gjørt sær greitt, at hon ætlar sær ikki at sigla alt lívið.

– Beinanvegin eg eri liðug á skúlanum, ætli eg mær burtur, tí eg vil hava tað burtur av mær meðan eg enn eri ung og eingi børn eigi.

Men tá ið tankin um børn og familju kemur, ætli eg mær í land.

– Á landi í Føroyum eru eisini nógvir møguleikar, kanska hjá SEV, ella á onkrum virki. Kanska verði eg lærari – ella kanska maskinmeistari við Teistanum, leggur hon afturat.

Hon dugir ikki at síggja nakra forðing fyri, at konufólk verða maskinmeistarar.

– Hevur tú hugin og hegni, er av-



*Elisabet Dalsgaard: Hon hugsar ikki nógv um, at tær eru so fáar gentur ímillum nógvar dreingir.*

gjørt eingin orsøk at halda seg aftur, sigur Elisabet Dalsgaard.

Hon hugsar ikki nógv um, at tær eru so fáar gentur ímillum nógvar dreingir.

Hon sigur, at hóast tær eru gentur, skulu tær ikki viðfarast sum brotin egg og tað er heldur ikki soleiðis, at dreingirnir ganga á tá, fyri tað, um tær eru á skúlanum.

– Onkuntíð er prátið ikki er so „femenint“, men tað er bara at lata oyruni aftur. Húðin harðnar skjótt so tað venur man seg beinanvegin við, sigur hon.

– Men tað er kortini ikki altíð, at yvirskotið er til mannfólkaprát og so er tað fínt, at vit eru tríggjar gentur í flokkinum og vit koma allar væl útav tí, sigur Elisabet Dalsgaard.

# Gunn Danielsen: Valdi sjólívið í fólkaskúlanum

Tað var, tá ið hon var í starvsvenjing umborð á Finni Fríða í níggjunda flokki, at Gunn Danielsen valdi sjólívið



Umborð á Finni Fríða uppagaði eg, hvussu spennandi sjólívið er sigur Gunn Danielsen.

– Hjá mær skal tað altíð henda okkurt. Tað sigur Gunn Danielsen, sum býr í Saltangará. Tí kom hon hálvavegna í neyð, tá ið hon skuldi velja sær praktikkpláss í fólkaskúlanum.
– Allar hinar genturnar fóru í frisørsalongir og sovorði, men tað tímdi eg ikki.
So skeyt beiggi hennara upp, at hon skuldi royna at sleppa við einum skipi.
– Tað helt eg, ljóðaði spennandi og tað endaði við, at eg slapp við Finni Fríða.
Gunn Danielsen sigur, at tá varnaðist hon, hvussu spennandi sjólívið var.
Skiparin vísti henni tólini á brúnni og, hvussu tey virkaðu. Tá fall avgerðin um, at hetta skuldi vera hennara lívsleið.
Hon sigur, at eftir fólkaskúlan slapp hon við aftur Finni Fríða og har fekk hon siglingstíð. Hon gekk eisini á Sjómansskúlanum í Klaksvík áðrenn hon fór á navigatiónsskúla á Vinnuháskúlanum, har hon gongur í sama flokki sum beiggi hennara.
Tá ið hon er liðug skal hon út at sigla, men tað verður uttanlands, sigur hon.
Hon sigur, at sum genta fær hon nógvar spurningar um, hvussu tað verður hjá eini gentu at sigla og hvussu verður við manni og børnum.
Men tað tekur hon, sum tað kemur.
– Eitt er at sigla, men tað ber altíð til at gevast, tá ið hugurin til sjólívið minkar, sigur hon.

# Una-Cecilia Hentze Jensen: Eg vildi læra meir

Útbúgvingin er torfør, men tað ger tað ikki minni spennandi



– Eg vil hava eitt fjølbroytt arbeiðið, og tað er maskinfakið so sanniliga, sigur Una- Cecilia Hentze Jensen.

**– Eg vildi byggja víðari á tað, eg hevði**

Tað sigur Una-Cecilia Hentze Jensen úr Havn, sum er ein av teimum 4 gentunum, sum eru næmingar á Vinnuháskúlanum.

Í apríl í ár varð hon útlærd sum maskinsmiður hjá Landsverki í Kollafirði, og nú vildi hon sleppa at útbúgva seg víðari.

Men hon hevur tað ikki heilt frá fremmandum, tí abbi hennara, Jørleif Hentze av Sandi, var kendur sum dugnaligur maskinsmiður og hann var eisini lærari á tekniska skúla.

Hon ásannar, at maskinfakið er ikki eitt fak, sum nógvar gentur hava hug til.

Men hon trívist væl á skúlanum og hon trívist væl ímillum dreingirnar.

– Teir eru fínir at hava við at gera.

Hon sigur, at henni dámar væl at fáast við handverk og arbeiðið skal helst vera fjølbroytt og tað er maskinfakið.

– Men sum maskinmeistari havi eg eisini nógv betri møguleikar, sigur hon.

Hon ásannar, at talan er um eina torføra útbúgving, men tað ger tað ikki minni spennandi.

– Eg taki tað, sum tað kemur, og tað skal nokk ganga.

Tó at hon trívist væl í teirri mannfólkaverð, sum Vinnuskúlin enn er, so heldur hon eisini, at tað er fínt, at tær eru nakrar gentur.

– Sjálvandi hava vit nógv saman, men halda okkum avgjørt ikki fyri okkum sjálvar.

Una hevur ikki rættiliga gjørt av, hvat hon ætlar sær, tá ið hon er liðug.

Eg kundi hugsað mær at verið á landi, men eg vænti, at eg fari at sigla.

Men tað verður við útlendskum skipi, tí man fær ov lítið burtur úr at sigla í Føroyum.

Una hevur eitt lítið barn, men tað fer ikki at forða henni í at sigla.

– Mamma mín er altíð klár at hjálpa mær, tá ið á stendur, so eg havi eitt gott og trygt bakland, sigur hon.

# Sólgerð Joensen: Vildi hava fleiri møguleikar

Sum maskinmeistari havi eg nógv fleiri møguleikar at fáa starv.



Eg ætli at arbeiða meg upp til at verða „chiefur", sigur Sólgerð Joensen.

**– Eg vildi hava fleiri møguleikar. Tað sigur Sólgerð Joensen, úr Kvívík.**

Hon er ein av teimum trimum gentunum, sum er farin á Maskinmeistaraskúlan í summar.

Hon er útlærd bilmekanikari hjá Reyni Service, men hon føldi, at tann útbúgvingin var ov avmarkandi.

Tað var ikki ordiliga av tilvild, at hon fór handverkaravegin.

Mamma hennara er elektrikari og tá ið Sólgerð var lítil, var hon ofta við mammuni til arbeiðis og slapp at royna seg við ymiskum.

– So tá ið hon skuldi velja sær eitt pláss til starvsvenjing í fólkaskúlanum søkti hon um at sleppa til Reyni Service í Havn.

– Tað dámdi mær so mikið væl, at tá ið skúlin var liðugur, søkti eg um lærupláss og slapp í læru, eftir at hon hevði tikið SIT.

– Sum maskinmeistari hevur tú nógv fleiri møguleikar, bæði á sjógvi og landi – og ikki minst í oljuvinnuni, sigur hon.

Tá ið hon er liðug, ætlar hon sær at sigla.

– Eg ætli at arbeiða meg upp til at verða „chiefur". Men tað verður uttanlands, tí lønarlagið í Føroyum er ikki serliga lokkandi afturímóti aðrastaðni.

## Má brúka hendurnar

Hvat síðani hendur, veit hon ikki enn, men møguliga verður hon elinstallatør.

Hon eigur eitt lítið barn, men hon hevur gott bakland í mammu síni, sum altíð er til reiðar at bjóða.

– At fáast við handverk er akkurát eg. Eg riggi avgjørt ikki á eini skrivstovu, tí eg má sleppa at brúka hendurnar.

– Mær dámar eisini ordiliga væl at arbeiða saman við mannfólki. Sum konufólk noyðist tú alla tíðina at prógva, at tú klárar tað sama sum teir. Men tað er ein avbjóðing, mær dámar ordiliga væl.

– Men dreingir eru heldur ikki so „fornermisligir", sum summar gentur eru, leggur hon afturat.

Hon vónar, at markið ímillum siðvandu gentustørvini og mannfólkastørvini er við at kámast.

Hon ivast ikki í, at nógvar gentur halda seg aftur, tí tær tora ikki í holt við eina handverkaraútbúgving.

– Tað skulu tær ikki gera, tí vit klára tað akkurát líka væl, sum dreingirnir, sigur hon.

Og við trimum beiggjum, hevur hon eisini verið væl brýnd at vera ímillum mannfólk.

Talan hevur verið um at uppstiga útbúgvingina til „bachelor stig". Tað er fínasta slag, men Sólgerð veit ikki, um hon fer at gera nakað við tað.

– So skal eg á skúlabonk aftur, og tað havi eg ikki tikið støðu til, eg taki ein dag ísenn. sigur hon.

# VERDANDI hvarv við 15 monnum í 1944

VERDANDI var eitt av teimum mongu skipunum, sum hvurvu undir seinna heimsbardaga. Tað var Símun á Høgabóli í Saltangará, ið átti VERDANDI. Í bókum, sum eru skrivaðar um seinna heimsbardaga, verður hildið, at skipið fórst av krígsávum. Men hetta er ikki einasti møguleikin. Ein skrivlig kelda er óalmenna „Høgabólssøgan", sum Sverri Joensen, abbasonur Símun á Høgabóli, hevur skrivað

## Skipini á Høgabóli

Sverri Joensen skrivar, at tá krígg-ið brast á, fóru øll tey trý skipini á Høgabóli at sigla við ísfiski til Bretlands. Tey sigldu bæði vetur og summar. Í 1941 fóru sluppirnar Lizzi og Galathea á land úti á Skerum í eini ræðuligari ódn.

William Martin, sum reiðarafelagið á Høgabóli reiddi út í mong ár, fór á land úti í Rókini og sakk. Galathea, ið fekk størsta skaðan var til umvælingar í næstan eitt ár. Øll stýriborðssíðan var brotin, og tryggingin gav hana upp sum vrak.

Men av tí, at ov fá skip vóru, læt Símun á Høgabóli hana gera aftur á Tórshavnar Skipasmiðju. Tá ið hon var umvæld og skuldi verða flotað, vildi so illa til, at vognurin, sum hon stóð á, brotnaði, og hon datt niður á bakborðssíðu. Hon brotnaði so illa, at eisini hon mátti verða endurnýggjað øll, sum hon var.

Skipini á Høgabóli gjørdu til samans 55 túrar til Bretlands. Tey seldu fyri 140.709 pund til samans. Tað vóru 3,1 milliónir krónur tá. Í núatíðar krónum ein rimmar upphædd.

## VERDANDI fórst helst av veðri

Tá ið kríggið leið at enda, fóru føroyingar sjálvir at fiska við sluppunum, og tað var eisini gjørt við skipunum á Høgabóli. Hetta gjørdi eisini, at manningin gjørdist størri. Við Verdandi vóru 15 mans. Tá ið fiskur varð keyptur, vóru teir bara sjey.

Í oktober 1944 løgu nógv føroysk skip inni á Siglufjørðinum og krokaðu, tí veðrið var so ringt.

Galathea og Verdandi, sum báðar vóru farnar at royna við línu, løgu eisini inni. Túrurin hjá Galatheu var um at vera av. Men Verdandi var júst byrjað túr, og hon hevði bara havt einar tvær tríggjar setur. Av tí, at illveðrið vardi so leingi, og fiskurin var farin at eldast, varð gjørt av, at fiskurin umborð á Verdandi skuldi verða skipaður umborð á Galatheu, sum so skuldi fara til Bretlands við honum. Verdandi skuldi so fara til Akranes – norðan fyri Reykjavík – at keypa fisk upp í lastina.

So ein seinnapart var ein skái. Galathea slapp út og kom til Bretlands í øllum góðum. Dagin eftir var veðrið batnað nakað, men illveður var enn. Tá fór Verdandi av Siglufirði, men hon kom ongantíð vegin fram til Akranes.



Kjølbro átti Verdandi árini 1922 – 1928, myndin er tikin í illveðri undir Grønlandi.

Agenturin í Akranesi visti, at teir vóru á veg. Tá ið skipið ikki kom fram tann dagin, teir væntaðu tað, og tað heldur ikki frættist frá teimum teir næstu dagarnar, gjørdist órógvin størri og størri. Tað varð leitað bæði við flogførum og skipum uttan úrslit, og ein dagin boðaði íslendska útvarpið frá, at Verdandi helst var gingin burtur.

Menn meta, at teir eru farnir í Húnaflógvanum.



Málningur av Verdandi í góðum veðri. Skipið hvarv í ódnarveðri undir Íslandi í 1944.

## Ein óhugnalig kensla

Sum so ofta er hent við øðrum vanlukkum, so eru eisini frásagnir um, at menn høvdu ófrættakend ánilsi í sambandi við Verdandi.

Í bókini „Á Høgabóli" greiðir Sverri Joensen frá, at Jóhannes Sólheim á Glyvrum hevði leingi verið kokkur við Verdandi, og hann skuldi eisini fara henda túrin. Tann morgunin, sum teir skuldu fara avstað, kom Sólheim – sum hann vanliga varð nevndur – umborð við klæðsekkinum. Men komin niður í lugarið fær hann eina óhugnaliga kenslu. Tað var, sum ein rødd segði við seg, at hann mátti ikki fara við. Kenslan bleiv so sterk, at hann fór til skiparan og segði við hann, at hann kom ikki við.

Eingin fataði hetta rættiliga, tí hetta líktist als ikki Sólheim. Hann var kendur sum álitismaður í allar mátar og plagdi at halda sítt orð. Men her batti einki. Hann fór til hús aftur við klæðsekkinum. Skipið lág nú við ongum kokki, so teir máttu fáa ein nýggjan kokk sum skjótast.

Símun reiðarin, og Óli í Búrstovu skiparin, vóru báðir aftur hjá Sólheim og tosaðu við hann, men hann var ikki til at vika.

## Beiggi Óla játtar at vera kokkur

Óli tosaði so við beiggja sín Jakku, sum tá búði í Saltangará, um at koma við. Hann hevði ikki so góðan hug at fara, tí hann var í ferð við at flyta til Fuglafjarðar, har hann hevði bygt nýggj hús. Men fyri at hjálpa teimum úr støðuni, sum teir vóru komnir í, játtaði hann og fór við. Eftir hann sat konan við nígggju børnum. Tað yngsta var ikki føtt.

Marna, dóttir Sólheim, hevur greitt frá, at hon týðiliga mintist tann dagin Verdandi fór avstað sína seinastu ferð. Skipið fór siglandi yvir móti Saltnesi, og áðrenn tað fór undir, fór tað at rúka so illa, at tað hvarv í roykinum.

Tað seinasta, tey sóu til skipið, var eitt svart roykskýggj. Tað gav teimum eina óhugnaliga ófrættakenslu.

## Bestimaðurin Jens Knudsen og Nickel

Eisini varð sagt frá, at áðrenn Verdandi fór út av Skálafjørðinum, hevði bestimaðurin, Jens Knudsen í Saltangará, Jens á Vollanum nevndur, fingið sær ein blund. Stutt áðrenn farið varð, kemur hann upp úr kahúttini. So sigur ein maður av einum skipi skemtandi við hann: „Tað er ikki lukkuligt, sum tú fekk tað gott, soleiðis at kunna liggja og sova dagarnar burtur." „Tú skalt ikki øvunda mær hesa stuttu frívaktina, tí at eg fái onga aftur her í verðini," svaraði Jens álvarsamur.

Skiparin á Galatheu, Nickel, greiðir eisini frá, at tá ið teir koma niður ímóti Hetlandi, droymdi hann skiparan á Verdandi Óla í Búrstovu. Í dreyminum sigur Nickel við Óla: „Á Jesus, hvussu bóru tit tykkum at?" Óli svaraði: „Vit sigldu á Reykjanesboðarnar tann 8. oktober klokkan hálvgum fýra um morgunin." Tá vaknaði hann.

Reykjanesboðarnir eru teir boðar, sum liggja uppi í Húnaflógvanum, og eftir tíðini kundi væl verið, at hon var komin hagar náttina 8. oktober.

## Havið tók teir

Í bókini „Havið tók teir" greiðir Óli Jacobsen frá øðrum áhugaverdum hendingum, sum hava samband við Verdandi.

# Olivar Nolsø



*Olivar Nolsø*

**Føddur 18. juni 1967**

**Útbúgving:**

Maskinistur í 1992.

**Starv:**

Maskinistur hjá sp/f Sekstant umborð á m/s Tinganes.

**Hjúnafelagi:**

Waritsara.

**Fyrstu ferð til skips:**

25. januar 1984 við línuskipinum Jógvan Norði.

**Hevur verið við hesum skipum:**

Jógvan Norði, Blikur, Star Saga, Bjalto, Fram, Vesturbúgvin, Sjóborg, Græni, Báran, Margretha, Munkur, Skarvur, Helena, Váðasteinur, Edna, Nordvaag, Nordvik og Tinganes.

**Longsti túrur til skips:**

Næstan 4 mánaðir, frá 19/4-1997 til 30/8-1997 sum annarmeistari við Margrethu í Barentshavinum.

**Størsta avbjóðingin hjá einum maskinisti:**

Tað er øll tann nýggja tøknin og nýggjar mannagongdir, ið eru komnar seinnu árini. Tað hevur stóran týdning at fylgja við tí nýggju tíðini, dagføra øll skeiðini, sum eru neyðug, og ikki at ræðast avbjóðingar.

**Frítíðarítriv:**

Eg fáist við seyð og gangi túrar í fjøllunum.

**Bilur:**

Hyndai Getz.

**Telda:**

Toshiba.

**Besta Bókin:**

Bøkurnar hjá Svend Hazel.

**Besti sangur:**

Ein tann besti sangur mær dámar er, Tit sum í fjøru fóru,- haldi at hann lýsur væl baksið hjá teimun, ið løgdu lunnar undir okkara samfelag.

**Besti filmur:**

Shindlers List- hann lýsir hvat eitt einstækt menniskja er ført fyri at gera.

**Hvat kan gleða teg í gerandisdegnum:**

At tað gongur væl hjá teimun rundan um meg, eitt arbeiðspláss har eg trívsit, og har rættvísi valdar. Og ikki minst góðar starvsfelagar.

**Hvat kann øsa teg:**

Polittiskt dugnaloysi, vina- og kenningapolittikurin- ein gerð er eina arða verd. Tað er hugstoytt at síggja, hvussu polittikarar royna at draga til sín og síni, alt meðan teir krevja meira og meira av vanliga borgaranum.

Eg haldi, at um teir vístu seg sum undangongumen, tá tað snýr seg um at spara, hevði instillningurin hjá vanliga borgaranum verið ein annar. Men teir gera beint mótsætt, skulu aftur nú hava hægri løn, tað líkist ongum.

Treytin fyri trivnaði í samfelagnum er arbeiði til allar hendur. Seinastu árini er stórur partur av fiskivinnuni uppi á landi farin fyri bakka; teir siga at tað ikki er grundarlag fyri fiskavirkisarbeiði. Eg veit bert at virkið her í Havnini arbeiddi frystan fisk í 12 ár, hví ber hettar ikki til longur? Toskur mátti ikki veri so dýrur at keypt til dømis frá russum. So kundi man haft tað frysta til at havt afturat tí undan Føroyum. Tá kundi verið støðugt arbeiðið á fleiri virkjum kring landið.

Treytin fyri at fólk støðast her er, at arbeiði er til allar arbeiðsførar hendur.






Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til pensjón, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.

Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.

**Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum á tel 345 700 ella betri@betri.fo, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti.**

betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

# MERKTIR FISKAR

**Um merktur fiskur verður fiskaður, ynskir Havstovan upplýsingar um:**

- *Merkjanr.*
- *Fiskidato*
- *Positión*
- *Fiskalongd*
- *Skip*
- *Innsendara*
- *Bústað*
- *Kontonr.*




**Um til ber, ynskir Havstovan at fáa fiskin við eisini.**

**Afturfyri fær innsendarin bæði pening og lutaseðil/-ar, alt eftir um merki ella merki + fiskur verða latin inn.**

Lutakast er um
**kr. 12.500,-**
hvørt heyst

## FINNINGARLØN:

| | Merki | Merki + fiskur |
|---|---|---|
| Spagettimerki | Kr. 50,- + 1 lutaseðil | Kr. 125,- + 3 lutaseðlar |
| Goymslumerki | Kr. 125,- + 1 lutaseðil | Kr. 375,- + 3 lutaseðlar |
| + Kilopris fyri innlatnan fisk | | |



***Seinastu árini hevur Havstovan merkt tosk, havtasku, kalva og svartkalva.***





HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo






*Á myndini handar fráfarni forsetin Leif Wikstrøm- úr Finlandi- Pálli Hansen fundarhamaran hjá Nordiska Maskinbefälsfederationen. Páll Hansen varð valdur á fundi 9. september 2013 í Reykjavík. Næsti fundur í Norðurlendska felagnum verður í Helsingfors í mai 2014.*

# Páll Hansen valdur til forseta Nordiska Maskinbefelfederationen

Í heyst varð Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, valdur til forseta í Nordiska Maskinbefelfederationen. Eftir føroyskum mátistokki er talan um ein stóran felagsskap; limatalið liggur um 30.000.

6 norðurlendsk feløg eru limir í Nordiska Maskinbefelfederationen:

Svøríki: Sjöbefälsförbundet: *www.sbf.org.se*

Ísland: Vélstjórafelag Islands: *www.vsfi.is*

Noreg: Det Norske Maskinist forbund: *www.dnmf.no*

Finland: Finlands Maskinbefälsförbund: *www.konepaallystoliitto.fi*

Danmark: Maskinmestrenes Forening: *www.mmf.dk*

Føroyar: Maskinmeistarafelagið: *www.mf.fo*

Heimasíðan hjá Nordiska Maskinbefelfederationen: *www.nmfnordic.com*

## Forseti og sekretariat 2013 – 2016

Forsetin í Nordiska Maskinbefelfederationen verður valdur fyri trý ár. Tað vil siga, at Páll Hansen røkir hesa uppgávu fram til heystið 2016, tá forsetaval aftur er á skránni.

Her eigur eisini at vera nevnt, at sekretariatið hjá felagnum fylgir altíð við formanninum. Tí er skrivstovan hjá Maskinmeistarafelagnum nú sekretariat hjá Nordiska Maskinbefelfederationen, og Sjúrður Heinesen, ið er skrivari hjá Maskinmeistarafelagnum, er – hetta tíðarskeiðið- skrivari hjá norðurlendska felagsskapinum.

## Tíðarskeiðið 2014 – 2016

Í tíðarskeiðnum 2014 – 2016 hevur norðurlendska felagið samtykt at leggja serligan dent á hesi viðurskifti:

### Internt samarbeid:

* **NMF** skal bidra til, og stille høye krav/forventninger til medlemsorganisasjonenes individuelle virke og utvikling.

* **NMF** skal bidra til en god og effektiv koordinering av viten og erfaringer som er av felles interesse for medlemsorganisasjonene.

***NMF** skal, via et høyt sosialt ansvar, koordinere en felles nordisk innsats til forbedringer av områder i forbindelse med pensjon og seniorpolitikk.

* **NMF** skal avholde 2 konstruktive møter hvor emner av overordnet karakter behandles.

* **NMF** skal om nødvendig arrangere relevante konferanser.

* **NMF** skal oprette arbejdsgrupper som kan ivareta disse målsetninger og markedsføring.

* **Felagið** hevur eisini samtykt mál fyri „Ekstern internasjonalt arbeid“ og mál fyri „Udannelse og efterudannelse“.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Skipara- og Navigatør-felagnum:

03-07-13 **Maskinmeistarafelagið**

Manningarfeløgini hitta Jónas Sigmarsson reiðara um sáttmálaviðurskifti hjá útlendskum sjómonnum við FAS skipum. Donsk fakfeløg eru farin at krevja sáttmálaavgjald fyri føroyingar, sum sigla við hansara skipum.

10-07-13 **Dómhúsið**

Fyrireikandi fundur um tvingsilssølu av M/S Saga. Her er talan um eitt FAS skip við íslendskum eigara. ITF í London hevur heitt á okkum um at leggja hýru út vegna manningina (litavar og russarar og nakrir fáir íslendingar).

19-07-13 **Fiskivinnuráðið**

Fundur um at broyta hjáveiðureglurnar hjá smáu trolbátunum. Ráðið tók undir við at linka ásetingarnar.

08-08-13 **Gamla Apotek**

Sambandsflokkurin hevði boðið limunum í Fiskivinnuráðnum til at greiða frá okkara hugsan um endurskoðanina av lógini um vinnuligan fiskiskap. Tíverri kom tað næstan bert at snúgva seg um ásetan av fiskidagatali fyri komandi fiskiár. Fiskidagar vóru til viðgerðar í Tinginum um sama mundi.

20-08-13 **FSN**

Fundur við Lars Høglund reiðara úr Svøríki og Henzar Steingrímson reiðara. Kunnað var um gongdina í vinnuni og um hvørjir vansar standast av, at FAS er lýst sum eitt hentleikaflagg av ITF.

21-08-13 **Dómhúsið**

M/S Saga verður seld á tvangi. Eitt felag út Kongo keypti skipið í kappbjóðing móti fyrrverandi íslendska eigaranum. Manningarfeløgini høvdu hýrukrøv á góðar 600.000,- kr. Hetta var hýra vit høvdu lagt út fyri manningina. Her var bert talan um útlendingar, rætturin góðtók, at vit kundu eisini seta fram sjóveðrættarkrav fyri útlendskar sjómenn, sum ikki eru limir hjá okkum.

03-09-13 **ALS**

Fundur í ALS stýrinum, til viðgerðar var spurningurin um ALS skal stuðla keypi av frystum fiski til viðgerðar á føroyskum flakavirkjum. Eitt av endamálunum er at fáa meira støðugt arbeiði á virkjunum. Fiskavirkisskipanin hjá ALS letur stuðul upp til 32 tímar/viku og kostar meir enn 20 mill. um árið. Mett verður, at hetta kundi spart nógvan pening hjá ALS og, at inntøkan hjá teimum, sum arbeiða á fiskavirkjum kundi gjørst størri og nógv stabilari. Av tí, at hetta var seinasti fundur hjá sitandi stýri var endalig støða ikki tikin. Hetta var eisini seinasti fundur hjá Ingeborg Vinter, sum hevur sitið sum stýrislimur líka síðan ALS varð stovnað í 1992.

17-09-13 **FSN**

Nevndin í FSN hittist til at fyrireika komandi sáttmálasamráðingar fyri SSL.

04-10-13 **Fíggjarmálaráðið**

Sáttmálakrøv verða framløgd.

07-10-13 **Maskinmeistarafelagið**

Fundur við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip um, at føroysk reiðarí hava alsamt størri ampa av, at FAS er lýst sum hentleikaflagg.

09-10-13 **Norðurlandahúsið**

Fundur við Antares um felags áhugamál. FSN og MF gjørdu fyri nøkrum árum síðan eina granskingar– verkætlan um ávirkanina hjá útisiglarum á føroyska samfelagið. Antares hevur ynski um, at kanningin verður tikin uppaftur við dagførdum upplýsningum.

14-10-13 **FSN**

Samráðingarfundur við Lønardeildina; tað er uppá tal at slíta samráðingarnar.

15-10-13 **Maskinmeistarafelagið**

Fundur við Annfinn Olsen reiðara. Hann greiddi okkum frá ætlanum hansara við nýggja Akraberg. Nýggja skipið skal verða í 4 ymiskum fiskaríum, hesi eru: Heilfrysta tosk í Barenshavinum, rækjuveiðu við Svalbard, kongafisk í Irmingarhavinum og veiðu eftir sild og makreli við Føroyar. Flakasáttmálin verður brúktur til allar veiðihættirnar.

18-10-13 **Skálatrøð**

Fundur við Semingsstovnin; nú tað er staðfest, at samráðingarnar við Lønardeildina eru slitnaðar. Næstu dagarnar vóru dagliga fundir/samrøður.

24-10-13 **Strandfaraskipini**

FSN vitjar umborð á øllum skipunum har greitt verður frá støðuni í sáttmálaósemjuni. Breið semja er millum limirnar um at halda fast við okkara krøv.

28-10-13 **MF**

Fundur við Skipaeftirlitið um at fáa broytt FAS lógina soleiðis at til ber at fáa føroyska flaggið av listanum hjá ITF yvir hentleikafløgg. Feløgini fingu eisini kunning um hvørjar kanningar FMA ger fyri at fáa greiði á, hví Gullberg sakk so brádliga.

29-10-13 **Fiskimálaráðið**

Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot til broytingar í kunngerð um garnaveiðu eftir havtasku og svartkalva.

06-11-13 **Norðurlandahúsið**

Fiskivinnutingið; støðan hjá ymisku fiskastovnunum verður viðgjørd av fólki frá Havstovuni. Nógv var eisini gjørt burtur úr fíggjarligu gongdini hjá okkara heimaflota.

6 til 10-11-13 **Skálavík**

Semingsroynd. Fyri FSN luttóku Eyðstein, Regin, Leivur og Gulak. Depilin í Skálavík er stak vælegnaður til seming. Linjoln Christiansen vísti øllum samráðingarfólkunum runt í bygdini og greiddi frá. Hetta var sera áhugavert og lætti um ta spentu støðuna. Semja varð undirskrivað í Skopunarfirði umborð á Teistanum.

## Mugu vita meiri um hví Gullberg sakk

Tað vóru mong, sum gjørdust ikki sørt skelkaði, tá tað frættist at trolarin Gullberg var sokkin. Tíbetur var øll manningin bjarga, men missurin av skipinum er svárur bæði fyri manning og reiðarí.

Gullberg var eitt hampiliga nýtt skip, sum var í góðum standi og væl viðlíkahildið. Tí eru tað mong, sum undrast yvir hvussu hetta kundi henda. Fyri okkum sjómenn er enn meiri undrunarsamt, at skipið sakk eftir so stuttari tíð. Eisini at ongin ábending um nakran leka var sæddur frammanundan.

Sjófrágreiðingin gav ikki nakað greitt svar uppá hendan spurning. Sjógvurin fyltist so skjótt og brádliga í maskinrúminum, at ongin vón var um at halda skipinum lens. Hevði manningin ikki borið so skjótt at kundi ein stór vanlukka staðist av hesum.

FSN hevur á nevndarfundi samtykt, at vit vilja virka fyri at meira fæst at vita um hetta álvarsmál. Vit hava staðfest, at mong eru, sum gita um ymiskar orsakir til henda tilburð. Tað er á ongan hátt nøktandi fyri okkum sum fiski- og sjóvinnutjóð, at hetta álvarsmál ikki er lýst til fulnar.

Vit hava tikið málið upp við stjóran á Skipaeftirlitinum Hans Jóhannes á Brúgv; hann upplýsti okkum, at Skipaeftirlitið longu nú ger ávísar kanningar av hesum máli. Tað sýnist ikki at vera samsvar í millum, hvussu skjótt skipið fyltist og, hvussu nógv kann renna ígjøgnum tey ymisku sjósambondini. Hesi eru millum annað kølivatnsinntak og lensiventilar.



*Gullberg við bryggju í Havn.*

Vit mæltu til at fáa útgreinað hvørjar umvælingar eru gjørdar á sjósambondini líka síðan skipið varð bygt, og fáa samanhildið hesar upplýsingar við systurskipið Sjagaklett.

FSN fer at fylgja við hesum málið.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum:

**04-09-2013 MF**

Sáttmálasamráðingar: Á hesum fundinum løgdu partarnir sáttmálakrøvini fram. Vegna Maskinmeistarafelagið var nevndin møtt. Vegna KAF vóru Anita Fuglø og Maria á Brúnni møtt. Onki umboð fyri SEV var møtt. Fyri SSL vóru Páll Heinesen og stjórin Bogi Mortensen møttir. Nakrir spurningar vóru frá báðum pørtum til tað framlagda, sum blivu greinað nærri.

**9 & 10-09-2013 Reykjavík**

NMF fundur. Hesin fundur var kongress t.v.s. at nýtt stýrið skuldi veljast og var tað Maskinmeistarafelagið, sum stóð fyri tørni at hava hesa uppgávu tey næstu trý árini.

Landarapportirnar frá okkum og okkara grannalondum blivu lagdar fram.

Nakrir spurningar til rapportirnar vórðu settir. Eisini bleiv arbeiðið í felagskapum sum IMO, ITF umrøddir. NMF hevur sett sær sum málsetning at blíva meira sjónligt í ITF høpi. Útbúgvingarnar blivu eisini umrøddar.

**17-09-2013 MF & Vinnuháskúlin**

Fyrrapartin var fundur við Páll Nielsen um persóns- gerðarættarmál. Eisini varð komið inn á málið um Ednu og onnur skip, sum ikki halda sáttmálar og avtalur.

Seinnapartin var prógvhandan á Vinnuháskúlanum fyri maskinistum. Væl av fólki var samankomið og løtan var hugnalig við røðum prógv- og gávuhandan.

**20-09-2013 MF**

Annar samráðingarfundur. Partarnir komu nærri inn á krøvini hjá hvørjum øðrum; stórt sæð ein góður og hugnaligur fundur

Onki umboð fyri SEV var møtt til hendan fundin.

**23-09-2013 FSN**

Fyrsti blaðfundur hjá Mið & Magn eftir summarfrítíðina. Ein ætlan bleiv gjørd um blaðgreinir o.a. til komandi blað.

**25-09-2013 MF**

Fyrrapartin vóru sáttmálasamráðingar við Lønardeildina. Komið varð nærri inn á krøvini hjá báðum pørtum. Tað vísti seg skjótt, at størstu trupulleikarnir koma at verða sáttmálin við SSL. MF hevur sett fram krav um, at nýggju hvílutíðarreglurnar blíva hildnar t.v.s. at arbeiðstíðin kann í mesta lagi verða 91 tímar um vikuna. Tað kemur ikki upp á tal uttan so, at lønin lækkar samsvarandi sigur Lønardeildin. Seinnapartin vóru sáttmálasamráðingar við KAF um sáttmálan við SEV. Komið varð nærri inn á krøvini; góður og hugnaligir fundur. Umboð fyri SEV var eisini til staðar; semja var um at gera ymiskar útrokningar til komandi fund.

**30-09-2013 MF**

Fundur við áhugafelagið Antares; skrivarin kunnaði um felagið. Tosað varð m.a. um tvungnu eftirlønirnar, sum koma í gildi 1.1.2014 og ymiskt annað.

**02-10-2013 MF**

Framhald av sáttmálasamráðingunum við Lønardeildina. Tosað bleiv nógv um hvíldartíð hjá sjófólki uttan, at partarnir komu nærri hvørjum øðrum.

**03-10-2013 KAF**

Framhald av sáttmálasamráðingunum við KAF. Báðir partar høvdu til hendan fundin gjørt ymiskar útrokningar. Tað vísti seg, at semja var nøkulunda um tølini.

**08-10-2013 FSN**

Mið og Magn blaðfundur: Arbeitt bleiv við blaðgreinum til komandi blað og innihaldið var greitt.

**09-10-2013 Norðurlandahúsið**

Kaffimik fundur millum MF, FSN og Antares. Tosað bleiv um mál av felags áhuga; sera áhugaverdur fundir. Komið var millum annað inn á kanningina um útisiglarar.

**09-10-2013 MF Nevndarfundur**

Metingar vóru gjørdar um støðuna í sáttmálasamráðingunum við Fíggjarmálaráðið og KAF. Semja var um, at støðan um avtalu við SSL var fastløst og, at trupult varð at koma víðari. Eisini bleiv staðfest, at trupulleikar vóru við KAF.

**10-10-2013 MF**

Fyrrapartin vóru sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið. Semja var, at innan tað almenn á landi og Magnus Heinason vóru nakrar ósemjur, men ikki stórvegis. Viðvíkjandi SSL vóru ósemjurnar stórar. MF skeyt upp at halda frí til eftir heystfrítíðina, og um eingin hevði flutt seg tá, so má onkur annar koma upp í leikin.

Seinnapartin var KAF á skránni. Staðfestast kundi, at hóast semja var um tølini, so var man yvirordnað ikki samdur um heildina. Tí varð avtalað at hittast aftur eftir heystfrítíðina.

**15-10-2013 MF**

Stuttur fundur við Føroya Reiðarafelag fyri fiskiskip. Har vit millum annað fingu frágreiðing um sáttmálaviðurskiftini við Akraberg, har ætlanin er at brúka sama sáttmála til fleiri veiðihættir. Eisini varð tosað um at fáa gongd á arbeiðið at endurskoða felagsreglurnar.

**21-10-2013 FSN**

Mið og Magn blaðfundur. Tosað varð um komandi blað; onkur grein mátti útsetast og koma í annað blað. Annars liggur innihaldið nøkulunda fast.

**22-10-2013 MF**

Samráðingarfundur nr. 6 við FMR. Hesin fundur bleiv stuttur, konstaterað varð, at hvørgin av pørtunum hevði flutt seg síðan seinasta fund. Tí varð semja um at senda boð eftir semingsmanninum. Hesin kom stutt eftir á fundin og fekk eina stutta frágreiðing frá báðum pørtum um støðuna. Semingsmaðurin mælti til, at spurningurin um avleiðingarnar av MLC- konventiónini bleiv viðgjørdur fyri seg og, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag varð tikið við í hesum sambandi. Og at restin varð tikin hvørt felag sær. MF játtaði, og boð vóru síðani send til FSN, sum eisini svaraði játtandi.

**23-10-2013 MF**

Fundur við Annbjørg Abrahamsen, sum greiddi frá frá spennandi verkætlan, sum hon luttekur í saman við skandinaviskum starvsfeløgum um „Accident reporting in the fisheries/Registering av ullykker i fiskeriene“ og „Shift work, farigue and injuries in the fisheries/Arbeidstid, tretthet og skader i fiskeriene“. Verkætlanin er stuðlað av Nordisk Ministerråd. MF stuðlar eisini hesi ætlan.

**23-10-2013 MF**

Fundur millum MF, FSN og semingsmenninar. Hesin fundurin snúði seg um kunning til semingsstovnin um samráðingar um nýggjan sáttmálar fyri maskinmeistarar og navigatørar við skipunum hjá SSL. Semingsmenninir søgdu, at teir ætlaðu at byrja seming leygardagin og, at teir skuldu geva nærri boð um hetta.

**25-10-2013 FSN**

Stuttur fundur seinnapartin við semingsmenninar, har teir boðaðu frá, at teir taka eitt sonevnt time-out í semingsroyndini millum manningarfeløgini øðrumegin og Fíggjarmálaráðið hinumegin.

**28-10-2013 MF**

Fundur millum FMU og Sjóvinnustýrið um broytingar í FAS lógini. Tað er §9 í lógini, sum man vil broyta. §9 er í dag blivin ein meinbogi fyri menning av FAS. Uppskotið til nýggja orðing av §9 í FAS er orðað eftir §6 í norsku (NIS) lógini.

**31-10-2013 FSN**

Blaðfundur í Mið og Magn. Síðsta gjøgnumgongd av komandi blað. Seinnapartin henda dagin boðaðu semingsmenninir frá, at teir løddu frá sær. Sostatt vóru sáttmálasamráðingarnar slitnaðar. Manningarfeløgini boðaðu síðani frá, at verkfall byrjar um 48 tímar frá kl. 17:00 í dag.

**01-11-2013 MF**

Stuttur nevndarfundur um støðuna nú verkfall kann byrja kl. 17:00 í morgin. Umboð fyri felagið vóru á Vinnuháskúlanum og í viðarlundin til minningarhald teirra sjólátnu.

Seint hetta kvøldið sendu semingsmenninir manningarfeløgunum boð til fundar og boðaðu frá, at Fíggjarmálaráðið var komið við einum útspæli. Semja varð um at taka samráðingarnar uppaftur, og semingsmenninir útsettu eitt møguligt verkfall í 7 dagar.

**06-11-2013 Skálavík**

Partarnir í ósemjuni um SSL møttust hendan dagin á Deplinum í Skálavík, og byrjaðu samráðingarnar beinan vegin. Til slíkar fundir møtir Maskinmeistarafelagið altíð væl mannað so, at vit altíð eru viðtøkuførir. Semingsmenninir tosaðu við partarnar til eftir middag fríggjadagin; seinni hendan dagin løgdu teir fram eitt semingsuppskot, og bóðu partarnar svara umborð á Teistanum, sum sigldi kl. 17:00 av Skopum. Partarnir tóku undir við semjuni, og skrivað varð undir umborð.

**13-11-2013 Østrøm**

LÍV helt kunningarfund. Stjórin greiddi stutt frá reglunum í nýggju eftirlønarskipanini, sum kemur í gildi við ársskifti. Kunnað bleiv um íløgupolitikk, og um ætlanirnar hjá „Búsetur“ um leiguíbúðir.

**15-11-2013 MF**

Felagið tekur sáttmálasamráðingarnar uppaftur við SEV, KAF, FMR. Fyrrapartin SEV sáttmálin. Seinnapartin justera sáttmálan við SSL. Og samráðingar „alment lønt á landi“, Vørn og Magnus Heinason.

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Poulivar Johansen | 14-10-1943 | 70 ár |
| Sofus Jacobsen | 30-10-1943 | 70 ár |
| Jákup Egholm | 16-11-1943 | 70 ár |
| Jens Danielsen | 17-11-1943 | 70 ár |
| Guttorm Simonsen | 22-11-1943 | 70 ár |
| Edvard Hjalt Nicodemussen | 24-11-1943 | 70 ár |
| Sólbjørn Hansen | 25-11-1943 | 70 ár |
| Ruben Olsen | 04-12-1943 | 70 ár |
| Svend Ivan Hansen | 17-12-1943 | 70 ár |
| Daniel Kalsø | 21-10-1953 | 60 ár |
| Gunnar Isaksen | 24-10-1953 | 60 ár |
| Steingrím Samuelsen | 06-11-1953 | 60 ár |
| Jákup Pauli Egholm | 12-11-1953 | 60 ár |
| Kjartan Tómasson | 16-11-1953 | 60 ár |
| Leivur Christiansen | 10-10-1963 | 50 ár |
| Jens Joensen | 21-11-1963 | 50 ár |
| Regin Joensen | 12-12-1963 | 50 ár |
| Júst Sandur Poulsen | 29-12-1963 | 50 ár |
| Johan Hendrik Vík | 24-10-1973 | 40 ár |
| Jan Breiðaskarð | 01-11-1973 | 40 ár |
| Adrian Suni Fløtt | 14-11 1973 | 40 ár |
| Sjúrður Leivsson Ejdesgaard | 15-11-1973 | 40 ár |
| Hildibjartur F. Olsen | 30-11-1973 | 40 ár |
| Rógvi Heinesen | 04-12-1973 | 40 ár |
| Hjalmar S. Knudsen | 09-12-1973 | 40 ár |

## Maskinmeistarafelagið

| | | |
|---|---|---|
| Jákup Olaf Joensen | 10-31-1943 | 70 ár |
| Leivur Clementsen | 10-3-1953 | 60 ár |
| Dánjal Andreasen | 10-13-1953 | 60 ár |
| Jón S. Jørgensen | 10-27-1953 | 60 ár |
| Mikkjal Bærentsen | 10-3-1963 | 50 ár |
| Jan Kjell Jacobsen | 11-2-1963 | 50 ár |
| Helgi Fossdal Guttesen | 11-5-1963 | 50 ár |
| Ragnar Eliasen | 12-15-1963 | 50 ár |
| Jógvan Heini Olsen | 10-21-1973 | 40 ár |
| Jóan Magnus Lamhauge | 10-27-1973 | 40 ár |
| Ólavur Johannesen | 11-6-1973 | 40 ár |
| Hørður Mikkelsen | 11-14-1973 | 40 ár |
| Jacob Andreas Heinesen | 11-15-1973 | 40 ár |
| Jónleif Antoniussen | 11-16-1973 | 40 ár |



**Jákup Egholm skipari helt 70 ára føðingardag sín umborð á Polaris**

Jákup Egholm er føddur í Fuglafirði 16. november 1943. Hann hevur drúgvar royndir á sjónum; byrjaði 15 ára gamal í 1959, tá hann fór sín fyrsta túr við sluppini Sæborg. Árini eftir var hann m.a við Maseppu, Bernese og Gulldrangi hjá S.P. Petersen. Árini 1961, 62 og 63 róði hann út í Grønlandi um summari og um veturin var hann við Gulldrangi.

Leita vit okkum so nærri okkara tíð, so kunnu vit nevna, at hann í fleiri ár var við ídnaðarskipum, sum royndu í Norðsjónum. Vegna plásstrot er ikki møguligt at nevna øll skipini, sum Jákup Egholm hevur verið við. Men vit mugu nevna, at hann gjørdist ein av skiparunum, sum fóru at gera royndir við fiskiskapi eftir gullaksi.

Á heysti 1992 Jákup var skipari á Polarhav og royndirnar við hesum fiskiskapi vóru so mikið góðar, at reiðaríðið hættaði sær undir at fara at byggja tveir nýggjar – eitt sindur størri bátar – til fiskiskap, sum ein part av árinum burturav skuldu veiða gullaks. Hesir bátar komu til Føroya í 2004, og fóru alt fyri eitt undir fiskiskap. Jákup gjørdist skipari á nýggja Polarhav, og væl hevur ligið fyri; skipið hevur haft góðan fiskiskap til dagin í dag. Føðingardagin 16. november var Jákup á fiskifeltinum sum skipari umborð á Polarhav. Hann vildi onki hóvasták hava, men heilt onki bleyv tað kortini ikki. Kokkurin borðreiddi við lagkøku, og manningin fekk høvi til at ynskja skiparanum tillukku við teimum 70 árunum.

Vit loyva okkum her at senda Jákupi Egholm eina føðingardagsheilsu, og ynskju honum hjartaliga tillukku við teimum sjeyti árunum.







# Magnus Heinason er gamal, slitin og ótíðarhóskandi

Tá ið Magnus Heinason á sumri 2012 var til klassingar bleiv avdúkað, at nógvastaðni vóru pláturnar so mikið nógv tærdar, at tær vóru ov tunnar. Tí kravdi klassin, at nakrar plátur skuldu skiftast beinanvegin, meðan aðrar kundu bíða til árið eftir

### Umfatandi umvælingararbeiði

Umvælingararbeiði hevur verið so mikið umfatandi, at peningur ikki hevur verið til tær kanningar, sum ætlanin var at gera, og sum skipið vanliga hevur gjørt. Tað er stórt spell fyri føroyska fiskivinnugransking.

Erling í Liða, ið er útgerðarmaður, greiðir okkum frá, at umstøðurnar umborð eru ikki góðar. Hetta kemst fyrst og fremst av, at skipið ikki upprunaliga er bygt sum eitt havrannsóknarskip. Harnæst tí, at skipið er vorðið gamalt og ótíðarhóskandi. Hóast tað, er Magnus Heinason sjálvt grundarlagið undir virkseminum hjá Havstovuni, og hevur í mong ár fingið til vega dygdargóð data, sum verða brúkt í vísindaligum arbeiði, bæði her í Føroyum og í altjóða samstarvi.

Havstovan sær tí fram ímóti at fáa til vega eitt nýtt tíðarhóskandi havrannsóknarskip, sum lýkur øll altjóða krøv.

### Siglingarætlan

Siglingarætlanin hjá Magnus Heinason er tann sama ár um ár, tó við onkrum broytingum av og á. Hetta er tí, at tað er vísindaligt arbeiði, sum verður gjørt. Tá er neyðugt at kunna samanbera tølini og úrslitini ár um ár.

Vanliga byrjar kanningarætlanin í februar mánað og endar í november.

Tó hevur ætlanin verið skorin munandi seinastu tvey árini, tí Magnus Heinason hevur ikki fingið eykajáttan til krøv frá klassanum (DNV) til umvælingar.

Siglingarætlanin hjá skipinum, frágreiðingarnar frá túrunum og annað upplýsandi tilfar um Magnus Heinason er tøkt á heimasíðuni hjá Havstovuni www.hav.fo

### 13 mans eru við skipinum

Í løtuni eru tilsamans eru 13 mans við skipinum: 7 dekkarar, ein kokkur, tveir maskinmeistarar og 3 navigatørar. Teir eru 14 dagar umborð og so 14 í landi. Siglt verður mest um summarið; „avspáking" er um veturin.



Arbeitt verður umborð á Magnusi Heinason.





Skipari: Dánjal M. Christiansen.

**Maskinmeistarar og navigatørar við Magnus Heinason**

**Dánjal Jacob Lyderesen:**
*1. skipari.*

**Dánjal M. Christiansen:**
*2. skipari.*

**Axel Johan Larsen:**
*Stýrimaður.*

**Jørgen Poulsen:**
*Maskinmeistari.*

**Terji Holm Jacobsen:**
*Maskinmeistari.*

# 20 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum

Týsdagin 17. september vóru 20 prógv handað maskinistum á Vinnuháskúlanum. Í hesum sambandi skipaði skúlin fyri hátíðarhaldið í skúlahøllini; á skránni var felagssangur, røður og prógvhandan.



Poul Kristian Henriksen

Høvuðusrøðuna átti Poul Kristian Henriksen, ið er undirvísingarleiðari á maskinmeistaradeildini. Í røðu síni segði hann m.a. „Tøknin mennist við rúkandi ferð, og skal man fylgja við, ja, so skal ein alla tíðina syrgja fyri at menna seg sjálvan. Hetta kann gerast á ymiskan hátt, millum annað at lesa tíðarrit og taka skeiðir. Tað er tí er umráðandi, alla tíðina at verða dagførdur.

Tá hetta er sagt, ja so má man eisini hyggja inn til okkum sjálvar. Hvat hevur stovnurin at bjóða av eftirútbúgvingum innan maskinlinjuna. Her mugu vit ásanna, at tað stendur ikki væl til; hetta má og skal mennast um okkum skal vera lív lagað.

Prógvið tit hava fingið í dag gevur – við neyðugari siglingstíð – rætt at blíva maskinstjórar við skipum við eini framdrívningsmegi upp



til 3000 kW. Tað ljóðar kanska ikki av stórum. Men tað kemur ikki so sjáldan fyri, at skip við framdrívningsmegi uppá 3000 kW ella minni, hava ein ísettan mátt, ið er fleiri falda framdrívismegina; máttur, ið blívur brúktur til aðrar uppgávur enn framdrívningsmegi. Hetta kann koma at stilla tykkum stór krøv.

Maskinistar er ikki ein stórur fakbólkur, men fyri tann skuld hevur tykkara fak stóran týdning fyri samfelagið.

Her hevur ofta verið samanlíkan við ein gearkassa, eitt kervi, har tað eru nógv hjól. Har eru stór hjól og har eru miðal stór hjól, har eru eisini smá hjól. Um okkurt av hjólunum brotna, ja so steðar upp at mala, og hetta er galdandi um eitt av teimum smáu hjólunum brotnar. Vit eru øll bundin at hvørjum øðrum.

Tey góðu ráðini eg kann geva tykkum, er at vera álítandi, vísi ábyrgd, havi eina góða atferð, møti væl upp til avloysing, og veri opnir at taka ímóti góðum ráðum. Tá eri eg heilt vísir í, at tað kemur at gangast tykkum væl.

Til seinast vil eg ynskja, at Harrin verður við tykkum á allari lívsleið tykkara. So einaferð enn hjartaliga tillukku við próvnum".

Páll Hansen handar gávu frá Maskinmeistarafelagnum.



### Teir ið, fingu handað prógv:

Alen Eli Viderø, Absalon Østerø Wolles, Andrias Johannesen, Brestir Egilsson Beder, Brynjálvur Petersen, Búgvi Poulsen, Dánjal Múller Jacobsen, Eyðun Fríði Nielsen, Eyðun Magnussarson Jacobsen, Fróði Thomasen, Helgi Stefan Ingibjørnsson, Høgni Midjord, Jógvan Pauli Joensen, Jóhann Hansen, Kári Múller, Jacobsen, Kjartan Kári Smith Jensen, Petur Vágsgarð, Pætur Joensen, Sigurd Jan Tavsen og Uni Poulsen.

## Virðislønir vórðu handaðar:

*Hesar virðislønir vóru lætnar:*

**Búgvi Poulsen,** mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.

**Eyðun Fríði Nielsen,** kikara frá Maskinmeistarafelagnum.

**Petur Vágsgarð,** kikara frá Maskinmeistarafelagnum.

**Uni Poulsen** kikari frá Eik Banka.

# Stállínuskipini

Í summar kom í bókabúðirnar forvitnislig bók við heitinum Stállínuskipini, nýggj byrjan 1956-1961. Rithøvundur er Sigmar Bláberg. Sigmar kenna vit sum góðan tíðindamann, hann hevur arbeitt sum blaðmaður, og í mong ár hevur hann verið ein kend rødd í Útvarpi Føroya.

Vit kunnu siga, at søgan um hesi skip byrjar í 1956. Tá var støðan hjá føroyska fiskiflotanum hættislig. Føroyingar áttu – so at siga – ikki annað enn avdeyðagomul fiskifør, serliga var talan um sera gamlar sluppir. Hetta var ikki tað, sum føroyski fiskimaðurin ynskti, og tí leitaðu teir sær – í stórum tali – burtur í onnur lond. Teir flestu mynstraðu við norskum og íslendskum fiskiskipum, har inntøka og arbeiðsumstøðurnar vóru nógv betur enn umborð á føroysku dangunum.

## Eitt nýtt tíðarskeið

Men í 1956 byrjar eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari fiskiveiðusøgu. Í februar mánað í 1956 gjørdi felagið D. P. Højgaards Eftf. á Toftum sáttmála við norska skipasmiðju um at byggja fyrsta stállínuskipið til føroyska fiskiflotan. Talan var um Vesturhavið Blíða, sum kom til Føroya stutt fyri jól í 1956, og fór í vinnu fyrst í 1957. Ein stórur partur av bókini er um Vesturhavið Blíða. Helst ein ov stórur partur.

## Yvirlit yvir føroyska fiskiveiðusøgu

Men bókin byrjar ikki við søguni um Vesturhavið Blíða og onnur stállínuskip, sum komu nevnda tíðarskeið. Bókin byrjar við einum søguligum parti, sum er sera áhugaverdur at lesa. Í hesum parti skrivar rithøvundurin, at løgtingsfíggjarlógin 1955/1956 javnviðaði við 9,6 mió. kr. Og tá fyrstu stállínuskipini



*Vesturhavið Blíða, fyrsta línuskipið, sum kom í føroyska flotan.*

kostaðu áleið 1 mió. kr., so svarar tað til, at hvørt skipið kostaði áleið 1/10 av løgtingsfíggjarlógini.

Sigmar metur, at eftir dagsins peningavirði kostaði hvørt skipið millum 450 og 500 mió. kr.

Her skulu vit eisini hugsa um, at stállínuskipini gjørdust so ómetaliga nógv í tali, eftir fáum árum komu omanfyri 50 skip. Alt fleiri hava mett, at tey gjørdust ov mong.

Høvundurin nevnir sum dømi, at 400 mans mannaðu teir 16 línubátarnar, sum komu í 1961. Og vit kunnu skoyta uppí, at tí betur eru føroyingar heimkærir. Tað má vera orsøkin til, at teir mongu, sum í fimmtiárunum fóru við útlendskum fiskiskipum, komu aftur til Føroya og tóku tjansin við teimum nýggjastu skipunum, so hvørt tey komu til Føroya.

## Løgtingsnevnd

Á sumri í 1961 setti løgtingi eina nevnd at skriva frágreiðing um føroyska fiskivinnu. Í hesum sambandi skrivar Sigmar soleiðis: „Nevndin vísir á, at stór broyting hendi í desember 1956, tá fyrsti línubáturin kom til landi. Í 1957 komu tvey línuskip og í 1958 eitt. Síðani hendi ein broyting, sum ikki hevur verið størri. Frá 1957 til 1962 komu 37 línubátar; í 1961 komu 16 og í 1962 10.

Frá 1959 til 1962 komu 42 nýggj skip, sum tilsamans vóru 14.120 tons. Her má vera talan um øll nýggj skip, ikki einans stállínuskip. Í sama tíðarskeiði, 1959-1962, fóru 33 skip uppá 5.472 tons úr flotanum.

Frá 1955 og næstu 8 árini komu 40 línuskip til landið; tey vóru 32% av samlaða tonsatalinum. Hesi 40 skipini kostaðu tilsamans 52,5 mió. kr. Hetta er nærmast ein ófatilig menning".

## Samrøður við fiskimenn

Nógv tann størsti parturin av bókini fevnir um samrøður, sum Sigmar hevur haft við menn, sum sigldu við teimum fyrstu línuskipunum. Men tí verri er hetta ikki tann sterkasti parturin av bókini. Tað er mangt, sum bendir á, at Sigmar hevur „bandað" og avskrivað allar samrøðurnar, og hevur ikki brúkt ta tíð, sum skal til fyri at samskipa tað, sum er komið upp á band. Tí eru ov mangar endurtøkur, og tí er eisini vandi fyri, at mangir lesarar leggja bókina frá sær áðrenn øll bókin er lisin.

Á teimum báðum aftastu síðunum er eitt yvirlit við 16 línuskipum, sum komu í 1961. Og har skrivar Sigmar Bláberg, at teir verða umrøddir í næstu bókini. Ta bókina gleða vit okkum eisini til at lesa.



# Áhugaverd bók um farmaskipið Oyrnafjall

Heðin Samuelsen, skipsførari, hevur á egnum forlagi givið út áhugaverda bók, ið hevur heitið „Søgan um Løgtingsskipið S/s Oyrnafjall.

Sum heitið á bókini boðar frá, so var ikki talan um eitt skip, ið var rikið á privatum hondum.

Talan er um eitt farmaskip, sum løgtingi átti árini 1947-1955. Skipið sigldi undir føroyskum flaggi, í fríum farti – um allan heim – stóran part av tíðini.

Einastu samskiftismøguleikar, sum tá funnust, vóru brøv og fjarrit. Tað, sum er einastandandi er, at alt samskifti ímillum skipið og reiðaríið í Havn er varðveitt á Landsskjalasavninum. Tað hevur givið rithøvundanum ein einastandandi møguleika at skriva eina góða bók.

Av tí, at Oyrnafjall nærmast var eitt politiskt „ekspermentarium" varð dúgliga skrivað í donskum og føroyskum bløðum um skipið. Alt hetta tilfarið verður væl lýst í áhugaverdu bókini hjá Heðin Samuelsen um Oyrnafjall.

Í bókini er dentur lagdur á at lýsa ta fíggjarligu eins væl og ta politisku síðuna av søguni um skipið.

Nógv myndatilfar er eisini fingið til vega frá monnum, sum sigldu við skipinum. Hetta gevur eina livandi mynd av lívinum umborð.

Heðin skrivar, at skipið varð keypt – helst alt ov dýrt – og saman við fleiri óhappum var raksturin tungur tey fyrstu árini. Men tíðirnar batnaðu fyrst í 50'árunum og Oyrnafjall helt fram við at sigla til á jólum 1955, tá ið løgtingið legði skipið.

## Spennandi frásagnir

Nógvar spennandi frásagnir eru í bókini. M.a. ber til at lesa um



*Løgtingi átti Oyrnafjall árini 1947-1955.*

hendingina, tá ið maskinmenninir gloymdu at koyra vatn á ketilin í Gdynia. Skipið legðist lamið – fullfermt við riflum og patrónum til islamiska statin Pakistan.

Ein onnur søga er um tíðindamannin Eiden Müller, sum var við skipinum ein túr úr Grønlandi niður í Miðjarðarhavið. Hann lýsir gongdina frá tí, at fiskurin kemur umborð til hann liggur á borðinum hjá italskum húsmøðrum.

Ein annar partur er ein syrgilig søga um ein blaðungan argjadrong, sum lat lív í Rotterdam í juni 1955. Drongurin var saman við øðrum farin ein túr í tivoli, tá hann var áhaldsin og datt úr einum vogni í rutsjibananum.

## Fín forætning fyri danska statin

Høvundurin greiður frá, at nógvir føroyingar liva í tí trúgv, at Oyrnafjall var gáva frá teimum sameindu fyri krígsmiss, men í mongu søguligu skjølunum eru eingi prógv um tað. Hann sigur, at tað er heldur hinvegin, at tað er nógv sum bendir á, at íløgan, sum løgtingið hekk uppá bleiv ein „fín forætning" fyri danska statin.

Stórt politiskt rok og blaðskriving stóðst eisini av keypinum, tí íløgan var so stór – kostnaðurin var úti við helmingin av fíggjarlógini hjá løgtinginum tá.

## Byrjanin og endin

Ítøkiliga søgan um skipið byrjar, tá ein nevnd hjá løgtinginum var til samráðingar við donsku stjórnina í 1947 um eina nýggja stýrisskipan. Í nevndini vóru umboð fyri allar flokkar á løgtingi. Undir hesum samráðingum greiddi løgtingsnevndin donsku stjórnini frá, at ætlanin var at keypa eitt farmaskip, sum løgtingi skuldi eiga og reka. Skipið skuldi ikki sigla eftir eini fastlagdari ferðaætlan; tað skuldi sigla í fríum farti.

Danska stjórnin hevur ivaleyst hildið, at ætlanin hjá løgtinginum var skilagóð – eisini fyri danska statskassan – tí tá samráðingarnar vóru av hevði danska stjórnin átikið sær at fíggja skipakeypið. Soleiðis gjørdist møguligt hjá løgtinginum at keypa eitt farmaskip; 4050 dw, bygt í 1929 fyri 2.200.000,- kr. Lánið skuldi gjaldast donsku stjórnini aftur við 1/20 hvørt hálvár; rentan varð ásett at vera 4,5% p.a.

Tá ið løgtingið vildi sleppa sær av aftur við skipið hevði tað mist sítt virðið, og endaði tí sum gamalt jarn.

Tá ið høvundurin tekur samanum, sigur hann, at tey 8 árini skipið var rikið fyri almenna rokning, kostaði tað landskassanum áleið 650.000,- kr. Og vit kunnu skoyta uppí, at tað var nógvur peningur í 1955.

Bókin er – í allar mátar – eitt væl úr hondum greitt verk; til longdar er bókin 240 blaðsíður.

Nú tað stundar til jóla fara vit, at enda nevna, at tað er onki at ivast í, at her talan um eina bók, sum mong vera fegin um at fáa í jólagávu.

# Laga tað góða lívið til framtíðina



ekko 239 239